ISBN 99918-60-09-6

# Vinnulívið í Suðuroynni í 2006

Dennis Holm og Bogi Mortensen

*Granskingardepilin fyri Økismenning*

## ARBEIÐSRIT NR. 14/2007

*Um arbeiðsrit:*

**Arbeiðsrit eru samfelagsfakliga grundað arbeiði, sum eru minni í vavi og dýpd enn veruligar granskingarverkætlanir. Hesi rit kunnu eitt nú vera umbidnar kanningar, t.v.s. kanningararbeiði, sum Granskingardepilin ger móti gjaldi. Hetta kunnu eisini vera ávegis arbeiði av størri granskingarverkætlanum, undirvisingar- og kunningartilfar ella líknandi. Arbeiðsrit vera altíð skrivað á føroyskum. Hava fólk handrit, sum tey halda eru egnað til útgávu í Arbeiðsriti, eru tey vælkomin at seta seg í samband við depilin (sí adressu á forsíðuni).**

**Økislýsing 2006 / 2007**

Arbeiðsritið er partur av verkætlanini Økislýsing 2006 / 2007, sum Granskingardepilin fyri Økismenning fór undir í mai mánað 2006. Hetta er triðja útgávan í smb. við verkætlanina Økislýsing 2006 / 2007. Higartil eru givnar út hesar útgávur:

Arbeiðsrit 13/2007: Fólk og vinna í Sandoyar Sýslu í 2006, Dennis Holm og Bogi Mortensen

Arbeiðsrit 11/2006: Arbeiðsmegin á føroysku flaka- og fiskavirkjunum í framtíðini, Dennis Holm og Bogi Mortensen

Arbeiðsrit 10/2006: Hækkandi oljuprísir, djúpvatnstrolarar og møguliga avleiðingar fyri Suðuroynna, Bogi Mortensen og Dennis Holm

# Innihaldsyvirlit

**1. Inngangur** ..... 5
**2. Háttalag og avmarkingar** ..... 7
2.1. BÝTIÐ Í VINNUBÓLKAR ..... 8
**3. Talið av parta- og smápartafeløgum** ..... 10
3.1. ØKT TAL AV PARTA- OG SMÁPARTAFELØGUM SEINASTU 5 ÁRINI ..... 10
3.1.1. Flest feløg innan handils- og tænastuvinnuna ..... 12
3.2. GEOGRAFISKA BÝTIÐ AV FELØGUM Í SUÐUROYNNI ..... 13
3.2.1. Lutfalsliga nógv nýggj feløg stovnað í Vági í 2006 ..... 14
3.3. FÆRRI FELØG Í SUÐUROYNNI ENN Í LANDINUM SUM HEILD ..... 15
**4. Roknskapartøl fyri Suðuroy** ..... 17
4.1. SKIFTANDI ÚRSLIT Í ÁRUNUM 2002 - 2005 ..... 17
4.2. ÓSTØÐUG GONGD HJÁ VINNUNI Í SUÐUROY ..... 19
4.2.1. Fiskivinnan ..... 20
Roknskapartøl fyri fiskivinnuni ..... 21
4.2.2. Handils- og tænastuvinnan ..... 26
Roknskapartøl fyri handils- og tænastuvinnuna ..... 27
4.2.3. Ídnaðar- og handverksvinnan ..... 29
Roknskapartøl fyri ídnaðar- og handverksvinnuna ..... 29
4.2.4. Alivinnan ..... 33
4.3. BRUTTOVINNINGUR ..... 35
4.3.1. Fiskivinnan ..... 36
4.3.2. Handils- og tænastuvinnan ..... 38
4.3.3. Ídnaðar- og handverksvinnan. ..... 38
4.4. SKULD OG EGINOGN ..... 39
4.4.1. Skuld ..... 39
4.4.2. Eginogn ..... 41
4.4.3. Veik vinna í Vági – sterk vinna í Hvalba ..... 43
**5. Lyklatøl fyri vinnuna í Suðuroy** ..... 45
5.1. LYKLATØL FYRI SUÐUROY ..... 46
5.2. LYKLATØLINI YMISK Í NORÐARU- OG SUNNARU HELVT AV OYNNI ..... 47
5.3. LYKLATØL FYRI VINNUBÓLKAR ..... 49
**6. Óstøðug gongd við minkandi inntjening** ..... 52
**7. Vakstrarvinnur og vakstrarmøguleikar** ..... 53
7.1. VAKSTRARVINNUR OG SUÐUROY ..... 54
7.1.1. Lítil vøkstur í Suðuroynni ..... 55
7.2. EIN AVBJÓÐING AT VELJA, OG VELJA RÆTT ..... 57
**Keldur** ..... 59
**Fylgiskjal 1. Lønargjaldingar 1985, 1995 og 2005** ..... 60

# Talvur

Talva 1. Tal av Parta- og smápartafeløgum í Suðuroy við árslok 2006. 11
Talva 2. PF og S/PF Stovnaði í Suðuroy og Føroyum árini 2000 – 2006. 15
Talva 3. Úrslit áðrenn skatt hjá vinnuni í Suðuroy í árunum 2002-2005. 18
Talva 4. Lønir í Suðuroy í útvaldum vinnubólkum í 2005, í 1.000 kr. og í prosentum. 20
Talva 5. Úrslit áðrenn skatt hjá fiskivinnuni í Suðuroy, býtt á fiskiskap og fiskavøruídnað. 21
Talva 6. Úrslit áðrenn skatt hjá fiskivinnuni í Suðuroy í árunum 2002-2005. 21
Talva 7. Úrslit áðrenn skatt hjá handils- og tænastuvinnuni í Suðuroy í árunum 2002-2005. 27
Talva 8. Úrslit áðrenn skatt hjá ídnaðar- og handverksvinnuni í Suðuroy í árunum 2002-2005. 29
Talva 9. Roknskapartøl hjá alivinnuni í Suðuroy 2002-2005 (í 1.000 kr.). 34
Talva 10. Bruttovinningurin hjá vinnuni í Suðuroy í árunum 2002-2005. 35
Talva 11. Bruttovinningurin hjá fiskivinnuni í Suðuroy, býtt á fiskiskap og fiskavøruídnað. 36
Talva 12. Bruttovinningurin hjá fiskivinnuni í Suðuroy í árunum 2002-2005. 36
Talva 13. Bruttovinningurin hjá handils- og tænastuvinnuni í Suðuroy í árunum 2002-2005. 38
Talva 14. Bruttovinningurin hjá ídnaðar- og handverksvinnuni í Suðuroy í árunum 2002-2005. 38
Talva 15. Skuld hjá vinnuni í Suðuroy í árunum 2002-2005. 39
Talva 16. Skuld hjá fiskivinnuni í Suðuroy í árunum 2002-2005. 39
Talva 17. Skuld hjá fiskivinnuni í Suðuroy, býtt á fiskiskap og fiskavøruídnað, í árunum 2002-2005. 40
Talva 18. Skuld hjá handils- og tænastuvinnuni í Suðuroy í árunum 2002-2005. 40
Talva 19. Skuld hjá ídnaðar- og handverksvinnuni í Suðuroy í árunum 2002-2005. 41
Talva 20. Eginogn hjá vinnuni í Suðuroy í árunum 2002-2005. 41
Talva 21. Eginogn hjá fiskivinnuni í Suðuroy í árunum 2002-2005. 42
Talva 22. Eginogn hjá fiskivinnuni í Suðuroy, býtt í fiskiskap og fiskavøruídnað, í árunum 2002-2005. 42
Talva 23. Eginogn hjá handils- og tænastuvinnuni í Suðuroy í árunum 2002-2005. 43
Talva 24. Eginogn hjá ídnaðar- og handverksvinnuni í Suðuroy í árunum 2002-2005. 43
Talva 25. Lyklatøl fyri Suðuroy árini 2002-2005. 46
Talva 26. Lyklatøl fyri Suðuroyar norðaru helvt árini 2002-2005. 48
Talva 27. Lyklatøl fyri Suðuroyar sunnaru helvt árini 2002-2005. 48
Talva 28. Lyklatøl fyri fiskivinnuna í Suðuroy árini 2002-2005. 49
Talva 29. Lyklatøl fyri handils- og tænastuvinnuna í Suðuroy árini 2002-2005. 50
Talva 30. Lyklatøl fyri ídnaðar- og handverksvinnuna í Suðuroy árini 2002-2005. 51
Talva 31. Lønarútgjaldingar (í 1.000 kr.) í Føroyum, árini 1985, 1995 og 2005, býtt á vinnubólkar. 54
Talva 32. Lønarútgjaldingar (í 1.000 kr.) í vinnubólkum í Suðuroyar sýslu, árini 1985, 1995 og 2005. 55

# 1. Inngangur

Hetta arbeiðsritið setur fokus á vinnuligu støðuna í Suðuroynni og gongdina hjá vinnulívinum í hesum partinum av landinum árini 2002 til 2005. Tað eru fleiri orsøkir til, at ein lýsing av hesum slagi er áhugaverd. Fyrst og fremst gevur ein vinnulig lýsing av Suðuroynni eina mynd av, hvussu støðan á vinnuligu síðuni er í oynni. Ein lýsing av hesum slagi gevur eisini eina mynd av, hvussu tað hevur gingist vinnulívinum í Suðuroynni tey seinastu árini. Ein slík lýsing er eisini ein týdningarmikil partur av metingunum um, hvørjar tær sterku og veiku síðurnar í vinnuligum høpi eru í Suðuroynni – og hvørjir vinnuligir møguleikar og hvørjar hóttanir eru hjá vinnulívinum í hesum partinum av landinum.

Sæð í einum landspolitiskum høpi er tað eisini áhugavert at seta fokus á støðuna hjá vinnulívinum í ávísum pørtum av landinum. Hetta millum annað orsaka av, at tey seinastu nógvu árini hevur tað verið ein greið politisk linja, at tað almenna skal skapa karmar, sum tað privata vinnulívið skal virka og mennast undir. Í hesum sambandi er tað somuleiðis ein áhugaverdur spurningur, um í hvønn mun lokala vinnulívið eina megnar at menna eitt økið.

Umframt nevndu viðurskifti er ein lýsing av hesum slagi eisini við til at svara fleiri meiri nágreiniligum spurningum um vinnulívið í Suðuroynni, har útgangsstøði er parta- og smápartafeløgini í oynni. Millum annað verður varpað ljós á:

- Hvussu nógv parta- og smápartafeløg eru í Suðuroy.
- Innan hvørjar vinnur virka hesi feløg.
- Hvussu stór hevur tilgongdin av feløgum verið seinastu árini.
- Hvussu er rakstrarliga gongdin og fíggjarliga støðan hjá feløgunum.
- Hvussu er rakstrarliga gongdin og støðan hjá ávísum vinnubólkum í Suðuroynni.

Vitan um hvussu støðan er í einum øki, bæði hvat viðvíkur tí vinnuliga partinum eins og trivnaði og gongd í fólkatali, er av stórum týdningi, tá umræður politiska fyriskipan. Tí er ein vinnulig lýsing av Suðuroynni eisini ein týdningarmikil liður í kommunalu- og landspolitisku fyriskipanini eins og í fyriskipanini hjá vinnuni sjálvari.

Avbjóðingin í Suðuroynni er – og hevur í nógv ár verið – at sleppa undan stórum vinnuligum sveiggjum, sum røkka út í hvønn krók í lokalsamfeløgunum í oynni. Í hesum sambandi kann ein vinnulig lýsing verða ein týðandi partur, tá leggjast skal til rættis, bæði upp á stutt sikt eins og upp á longri sikt.

Í seinasta parti av arbeiðsritinum er ein viðgerð av, hvørjar vakstrarvinnurnar í Føroyum eru og hava verið tey seinastu ártíggjuni, og hvussu gongdin hevur verið í hesum vinnum. Í hesum sambandi verður støðan og gongdin í Suðuroynni eisini samanborin við gongdina í Føroyum sum heild.

## 2. Háttalag og avmarkingar

Frágreiðingin er grundað á tilfar um parta- og smápartafeløg í Suðuroynni. Hetta tilfar er fingið til vega frá Skráseting Føroya og frá Business Line. Upplýsingarnir um parta- og smápartafeløg frá Skráseting Føroya eru frá ársloki 2006. Roknskapartølini frá Business Line fevna um tíðarskeiðið 2002 til 2005.

Umframt tilfar frá Skráseting Føroya og Business Line so eru egnar kanningar gjørdar fyri at staðfesta, hvørji feløgini eru, og hvar tey hoyra heima í vinnuligum høpi. Skráseting Føroya hevur síðan 2005 arbeitt við at flokka parta- og smápartafeløg í landinum, men hetta arbeiðið er ikki komið nakað áleiðis. Tí eru flokkingar av parta- og smápartafeløgum í oynni gjørdar út frá egnum kanningum.

Við tað, at lýsingin er grundað á parta- og smápartafeløg, sum eru heimahoyrandi í Suðuroynni, førir hetta eisini við sær nakrar avmarkingar. Ein avmarkingin er, at einstaklinga feløg ikki eru við í lýsingini. Hartil eru parta- og smápartafeløg, sum bert hava deildir í Suðuroynni, ikki við í lýsingini. Millum annað eru tað innan handilsvinnuna tveir stórir aktørar í Suðuroynni – FK Suðuroy og Bónus - sum ikki eru skrásettir í oynni. Somu viðurskifti eru galdandi fyri ein av stóru aktørunum innan fiskavøruídnaðin, Faroe Seafood, sum ikki er skrásett sum heimahoyrandi í Suðuroynni, men sum tó eigur og rekur stór flakavirkir á Tvøroyri og í Vági. Innan fíggjar- og tryggingarheimin og fjarskifti/telefoni eru somu viðurskifti galdandi, eins og oljufeløgini eru skrásett aðrastaðni enn í Suðuroynni.

At nevndu feløg ikki eru við í lýsingini, førir tískil við sær, at lýsingin á summum økjum er ófullfíggjað, tí hesi feløg skapa jú eitt virksemi í oynni, gera íløgur í oynni o.s.fr. Hinvegin so liggur eitt møguligt fíggjarligt avkast hjá hesum feløgum ikki eftir í oynni. Somuleiðis hevur ovasta leiðslan í hesum feløgum heldur ikki heimstað í Suðuroy.

Hóast nevndu avmarkingar er yvirlitið yvir parta- og smápartafeløg heimahoyrandi í Suðuroynni eitt gott grundarlag undir lýsingini av vinnulívinum í oynni. Hetta serliga tá hugsað verður um, at lýsingin eisini hevur til endamáls at vísa á, hvør vinnuligi

grundvøllurin í Suðuroynni er at taka á seg framtíðar avbjóðingar. Uttan ein vinnuligan grundvøll, sum er heimahoyrandi í Suðuroynni, kann tað gerast trupult at gerast partur av netverkum og knýta sambond við vinnur aðrastaðni í landinum og uttanlands. Eitt lokalt vinnulív er eisini ein partur av fortreytunum fyri at draga til sín fremmandan kapital, antin úr øðrum pørtum av landinum ella uttan úr heimi. Millum annað tí er tað eisini áhugavert at seta fokus á vinnulívið, sum er heimahoyrandi í Suðuroynni.

Eisini skal nevnast, at Suðuroyar Sparikassi ikki er við í uppgerðini. Orsøkirnar til hetta eru fleiri. Sum áður nevnt eru deildirnar hjá hinum peningastovnunum ikki partur av tilfarinum, og tískil vildi tað verðið ein ávísur ójavni í lýsingini, um bert Suðuroyar Sparikassi varð tikin við. Eitt annað er, at bankavirksemi er eitt heldur øðrvísi virksemi. Í 2005 vóru innlánini v.m. hjá Suðuroyar Sparikassa, ið roknskaparliga er tað sama sum skuldin hjá felagnum, uml. 340 mill. kr. Samlaða skuldin hjá vinnuni í Suðuroynni í 2005 var sambært tølunum frá Business Line uml. 333 mill. kr. Skuldin hjá Suðuroyar Sparikassa var sostatt størri enn skuldin hjá øllum parta- og smápartafeløgunum í oynni tilsamans. Og at seta slík tøl inn í hesum høpi gevur lítla meining. Hinvegin eigur at verða lagt til merkis, at Suðuroyar Sparikassi eisini fevnir um Suðuroyargrunnin[1], ið eigur stóran part av PF Suðuroyar Sparikassi og allan partapeningin í íløgufelagnum Kveiking. Hetta eru grunnar, ið hava lutfalsliga stóran kapital tøkan til íløgur – og eru hesir grunnar eisini virknir sum íleggjarar í vinnulívið í Suðuroynni.

## 2.1. Býtið í vinnubólkar

Í vinnulívslýsingini verður skilt millum feløg innan *Fiskivinnuna*, feløg innan *Handils- og tænastuvinnuna*, og feløg innan *Ídnaðar- og handverksvinnuna.* Meiri nágreiniligt fevnir bólkingin um hesar vinnur.

[1] Á vári 2006 varð Suðuroyar Sparikassi broyttur frá einum sjálvognarstovni til eitt partafelag. Stovnsfæið í "gamla" Suðuroyar Sparikassa varð flutt í Suðuroyargrunnin, sum varð stovnaður í hesum sambandi. – Og eigur Suðuroyargrunnin ein munandi part av partapeningin í PF Suðuroyar Sparikassi.

| **Fiskivinnan** | **Handils- og tænastuvinnan** | **Ídnaðar- og handverksvinnan** |
|---|---|---|
| Fiskiskapur | Handil og umvæling | Bygging |
| Fiskavøruídnaður | Gistingarhús og matstovuvirki | Landbúnaður |
| | Sjóflutningur | Skipasmiðjur, smiðjur |
| Ali- og kryvjivirki | Flutningur annars | Annar ídnaður |
| *(Ali- og kryvjivirki verða viðgjørd sjálvstøðugt)* | Vinnuligar tænastur | |
| | Húsarhaldstænastur | |

Hendan bólking er nakað øðrvísi enn vanliga bólkingin hjá Hagstovu Føroya, har skilt verður ímillum *1) Tilfeingisvinnu, 2) Vøruframleiðsluvinnu, og 3) Tænastuvinnu.*

**Hví velja hesa bólking?**

Tað eru fleiri orsøkir til, at ein øðrvísi bólking er vald í hesum arbeiðsritinum í mun til bólkingina hjá Hagstovu Føroya. Ein orsøkin er, at bólkingin í hesum arbeiðsritinum gevur eina greiðari mynd av, hvussu t.d. fiskivinnan í Suðuroynni er fyri – og hetta er sjálvsagt áhugavert, tí fiskivinnan er tann týdningarmesta vinnan í oynni. Leggjast kann afturat, at í lýsingini verður eisini skilt millum fiskiskap og fiskavøruídnað / framleiðsluna á landi.

Galdandi fyri handils- og tænastuvinnuna í Suðuroynni er, at ein stórur partur av vinnuni er avskorin frá marknaðinum í restini av landinum. Við øðrum orðum hevur hesin parturin av vinnuni í stóran mun Suðuroynna sum sín natúrliga marknað, men merkir tó stóra kapping frá handils- og tænastuvinnuni norðanfjørðs – uttan at bjóða seg nakað serligt fram á marknaðinum har. Tí er tað eisini áhugavert at hyggja at, hvussu hesin parturin av vinnuni í Suðuroynni er fyri.

Ídnaðar- og handverksvinnan í Suðuroynni virkar hinvegin á fleiri marknaðum. Umframt at virka í Suðuroynni so virkar vinnan eisini kring alt landið og í ávísan mun eisini uttanlands. Somuleiðis eru tað fleiri ídnaðar- og handverksfyritøkur í Suðuroynni, sum hava nógvan "útflutning", bæði vanligan útflutning út í heim og "útflutning" til aðrar partar av landinum. Hesi viðurskifti gera eina sjálvstøðuga lýsing av ídnaðar- og handverksvinnuna í Suðuroynni áhugaverda.

# 3. Talið av parta- og smápartafeløgum

Í hesum partinum verður talið av parta- og smápartafeløgum viðgjørt og greinað. Greiningin er grundað á tilfar frá Skráseting Føroya í Januar 2007.

Orsøkin til, at tað er áhugavert at hyggja at, hvussu nógv parta- og smápartafeløg eru stovnaði, er, at hetta sigur nakað um, um virksemi sum heild er økt, innan hvørjar vinnur virksemi er, og eisini hvar í oynni hetta virksemið er. Somuleiðis sigur talið av stovnaðum parta- og smápartafeløgum eisini nakað um entreprenørskap – um í hvønn mun suðringar eru eins ágrýtnir at stovna fyritøkur sum fólk í restini av landinum. Ikki minst so sigur hetta eisini eitt sindur um íløguhugin, og um í hvønn mun váðafúsur kapitalur er til staðar, tá umræður at stovna nýggj feløg.

## 3.1. Økt tal av parta- og smápartafeløgum seinastu 5 árini

Seinastu 5 árini er talið av parta- og smápartafeløgum í Suðuroynni tvífaldað. Hetta er ein vøkstur, sum lutfalsliga er sambæriligur við vøksturin í talinum av parta- og smápartafeløgum í landinum sum heild.

Í talvu 1. fevnir um talið av parta- og smápartafeløgum í Suðuroy við árslok 2006 (Skráseting Føroya, Jan. 2007). Feløgini eru býtt upp í feløg innan fiskivinnuna, innan handils- og tænastuvinnuna, og feløg innan ídnaðar- og handverksvinnuna. Feløgini eru eisini býtt upp í tær størru kommunurnar Tvøroyrar, Vágs og Hvalbiar kommunur, meðan tær smærri kommunurnar (Sumbiar, Porkeris, Hovs og Fámjins kommunur) eru savnaðar undir *Suðuroy annars*.

| | Hvalba | Tvøroyri | Vágur | Suðuroy Annars | Tilsamans |
|---|---|---|---|---|---|
| **Fiskivinnan** | | | | | |
| Fiskiskapur | 4 | 14 | 13 | 3 | 34 |
| Fiskavøruídnaður | 1 | 4 | 5 | 1 | 11 |
| Ali- og kryvjivirki | 1 | 0 | 3 | 0 | 4 |
| **Fiskivinnan tilsamans** | **6** | **18** | **21** | **4** | **49** |
| **Handils- og tænastuvinnan** | | | | | |
| Handil | 2 | 21 | 25 | 5 | 53 |
| Gisting, matstova | 1 | 3 | 1 | 0 | 5 |
| Flutningur | 2 | 4 | 2 | 4 | 12 |
| Aðrar tænastur / íløgufeløg | 3 | 17 | 23 | 1 | 44 |
| **Handils- og tænastuvinnan tilsamans** | **8** | **45** | **51** | **10** | **114** |
| **Ídnaðar- og handverks-vinnan** | | | | | |
| Bygging | 0 | 17 | 12 | 3 | 32 |
| Landbúnaður | 0 | 2 | 0 | 0 | 2 |
| Skipasmiðjur, smiðjur og annar ídnaður | 1 | 6 | 6 | 0 | 13 |
| **Ídnaðar- og handverksvinnan tilsamans** | **1** | **25** | **18** | **3** | **47** |
| | | | | | |
| **P/F og Sp/f tilsamans** | **15** | **88** | **90** | **17** | **210** |
| | | | | | |
| **Stovnaði í 2006** | **0** | **11** | **19** | **4** | **34** |

**Talva 1. Tal av Parta- og smápartafeløgum í Suðuroy við árslok 2006.**
*Kelda: Skráseting Føroya, Jan. 2007.*

Við árslok 2006 var samlaða talið av parta- og smápartafeløgum í Suðuroynni 210 feløg. 1. januar 2000 vóru tað uml. 100 parta- og smápartafeløg í Suðuroynni. Við øðrum orðum eru tað frá 1. januar 2000 til árslok 2006 stovnaði fleiri enn 100 parta- og smápartafeløg[2]. Vøksturin í talinum av partafeløgum tók dik á seg í 2002, tá 16 feløg vórðu stovnaði. Í 2003 og 2004 vórðu stovnaði ávikavist 21 og 19 feløg. Í 2005 var ein lítil minking í mun til undanfarin ár, tá 14 feløg vórðu stovnaði. Í 2006 vórðu sera nógv parta- og smápartafeløg stovnaði í Suðuroynni, tá heili 34 parta- og smápartafeløg vórðu stovnaði. Sama árið vórðu tað stovnaði 433 parta- og smápartafeløg í Føroyum, sostatt vóru sløk 8% av øllum feløgunum, sum vórðu stovnaði í Føroyum, heimahoyrandi í

[2] Hugsandi er tó, at í nevnda tíðarskeiði eru tað nøkur parta- ella smápartafeløg, sum eru stovnaði og strikaði aftur í tíðarskeiðinum.

Suðuroynni. Hetta er nakað minni enn lutfallið av fólkatalinum – við árslok 2006 búðu umleið 10% av Føroya fólki í Suðuroynni.

### 3.1.1. Flest feløg innan handils- og tænastuvinnuna

Av teimum 210 feløgunum vóru 49 feløg innan fiskivinnuna, meðan 114 feløg vóru innan handils- og tænastuvinnuna, og 47 feløg vóru innan ídnaðar- og handsverksvinnuna. Sostatt vóru meiri enn helvtin av feløgunum í Suðuroynni við árslok 2006 feløg innan handils- og tænastuvinnuna. Ein knappur fjórðingur av feløgunum var innan fiskivinnuna, og somuleiðis var ein knappur fjórðingur innan ídnaðar- og handverksvinnuna

Innan fiskivinnuna í Suðuroynni vórðu flest feløg skrásett innan fiskiskap – tils. 34 feløg – og fevna hesi feløg um bæði djúpvatnstrolarar, partrolarar, garna- og línuskip og smærri útróðrarbátar. Innan fiskavøruídnað – tvs. fiskaframleiðslu á landi – vóru skrásett 11 feløg í Suðuroynni.

Innan handils- og tænastuvinnuna vórðu 53 feløg skrásett sum handlar, meðan heili 44 feløg vóru skrásett innan aðrar tænastur/íløgufeløg. Í hesum sambandi kann nevnast, at tey seinastu árini eru lutfalsliga nógv feløg skrásett sum íløgufeløg, har endamálið er at eiga t.d. partabrøv í øðrum feløgum ella at eiga útleigaðar ognir. Innan flutning vóru skrásett 12 feløg í Suðuroynni. Talan er um feløg bæði til flutning av fólki og farmi.

Innan ídnaðar- og handverksvinnuna vóru 32 feløg skrásett innan byggivinnuna. Áhugavert er, at nøkur byggifeløg hava als onki virksemi Suðuroynni, men virka bert í øðrum pørtum av landinum og uttanlands. 13 feløg vóru skrásett innan skipasmiðjur, smiðjur og annan ídnað. Ein stórur partur av virkseminum hjá hesum feløgunum er framleiðsla til "útflutnings", bæði av landinum og til aðrar partar Føroyum. Í Suðuroynni vóru tað við árslok 2006 tvey feløg innan landbúnað, bæði vórðu skrásett í 2006.

## 3.2. Geografiska býtið av feløgum í Suðuroynni

Um hugt verður at, hvar í oynni tey ymisku feløgini eru skrásett, so er góð helvtin av teimum 210 feløgunum skrásett í norðaru helvt, meðan hin helvtin er skrásett í sunnaru helvt. Hetta samsvarar nøkulunda við lutfallið í fólkatalinum millum norðaru og sunnaru helvt av Suðuroynni[3].

**Hví býta upp í norðaru og sunnaru helvt av Suðuroynni?**
Seinastu nógvu árini hevur búskaparstøðan í Suðuroynni verði verri enn í landinum sum heild. Serliga er tað støðan í sunnaru helvt av oynni, sum hevur verið ring. Men spurningurin er, hvussu gongdin í vinnuligum høpi veruliga hevur verið tey seinastu árini? Tí er tað eisini áhugavert at seta fokus á ávikavist norðaru - og sunnaru helvt av oynni, umframt at taka støðuna í oynni í síni heild undir einum.

Um hugt verður at býtinum innan fiskivinnuna, so eru tað lutfalsliga fleiri feløg innan fiskiskap í norðaru helvt av oynni enn í sunnaru helvt – 18 í norðaru helvt og 15 í sunnaru helvt. Ein av orsøkunum til hetta er helst, at tann týdningarmesta fyritøkan innan fiskiskap í Vági[4] fór á húsagang fyrst í 1990árunum. Hetta gjørdi, at talið av fiskiskipum á Vágsfirði minkaði munandi í 1990árunum. Talið av stórum fiskiskipum á Tvøroyri og í Hvalba vaks hinvegin í sama tíðarskeiði.

Í sunnaru helvt av oynni eru tað hinvegin lutfalsliga fleiri feløg innan fiskavøruídnað enn í norðaru helvt av oynni. Ein orsøk til hetta er helst, at tað innan fiskavøruídnað í nógv ár hava verið tveir stórir aktørar á Tvøroyri[5] – Faroe Seafood og Delta Seafood. Hetta hevur helst minkað um áhugan at stovna nýggj feløg innan fiskivinnuna á landi. Tað stóra virkið í Vági, vanliga nevnt "Polarfrost", sum Faroe Seafood nú eigur, hevur tey seinastu 10-15 árini ligið stilt ella havt avmarkað virksemi[6]. Hetta hevur ført við sær, at aðrar fyritøkur eru farnar undir at virka fisk í Vági, soleiðis at tað í dag (apríl

[3] Umleið 55% av fólkinum í Suðuroynni búgva í norðaru helvt av oynni, meðan 45% búgva í sunnaru helvt.
[4] Fyritøkan hjá Jákup Joensen o.fl., sum átti flakavirki Polarfrost í Vági og fleiri trolarar, sum vóru knýttir at virkinum.
[5] Tað eru tó aðrar minni fyritøkur innan fiskivinnuna á landi á Tvøroyri, m.a. fyritøkan Eldborg Fisk, sum hevur lagt seg eftir at framleiða fiskaúrdráttir til heimamarknaðin, eitt nú marknaðin í miðstaðarøkinum.
[6] Faroe Seafood byrjaði tó í Feb. 2007 av álvara at taka ímóti fiski og arbeiða feskan fisk til frystar fiskaúrdráttir (Kelda: Suðurrás).

2007) íroknað Faroe Seafood eru 4 fyritøkur[7], sum virka fisk í Vági; harumframt er eisini eitt fiskavirki í Lopra (sum tó hevur havt avmarkað virksemi seinasta árið).

Um hugt verður at handilsvinnuni og ídnaðar- og handverksvinnuni, so eru tað lutfalsliga fleiri feløg í handilsvinnuna í sunnaru helvt av oynni, meðan tað eru lutfalsliga fleiri feløg innan ídnaðar- og handsverksvinnuna í norðara parti av oynni. Áhugavert er, at av teimum 44 feløgunum, sum eru skrásett innan aðrar tænastur og/ella sum íløgufeløg, eru 1/3 av hesum íløgufeløg, sum í flestum førum virka innan fiskivinnuna.

Innan alivinnuna eru 4 feløg skrásett í Suðuroynni. 3 feløg eru skrásett í Vági, og virka hesi feløg innan aling v.m. av laksi og sílum. Eitt felag er skrásett í Hvalba innan aling. Hetta felag virkar innan aling av toski, ið er ein nýggj vinna í Føroyum.

### *3.2.1. Lutfalsliga nógv nýggj feløg stovnað í Vági í 2006*

Av teimum 34 feløgunum, ið vórðu stovnað í Suðuroynni í 2006, vóru heili 19 heimahoyrandi í Vági. Orsøkirnar til hetta kunnu ivaleyst vera fleiri. Ein er, at fleiri "gamlar" fyritøkur í Vági hava skift eigara, og nýggj feløg eru sett á stovn í hesum sambandi. Harumframt eru eisini nakrar nýggjar fyritøkur stovnaðar innan "nýggjar" vinnur. Ein onnur orsøk er møguliga eisini, at sunnara helvt av Suðuroynni hevur merkt eina framgongd á vinnuliga økinum seinastu tíðina, og økir hetta sjálvsagt um íløguhugin. Óivað er ein orsøkin eisini at fleiri privat feløg leggja rakstur sín yvir í parta- og smápartafeløg.

Feløgini, sum eru stovnaði í Vági í 2006, fevna bæði um feløg innan fiskivinnuna, innan handverksvinnuna, umframt íløgufeløg og feløg, sum hava til endamáls at eiga og reka fasta ogn.

[7] S/pf Fløgan, ið virkar sum uppboðssøla í Vági, er tá ikki tald við, hetta er somuleiðis galdandi fyri Faroe Cold Stores, sum eigur stóra frystugoymslu í Vági.

## 3.3. Færri feløg í Suðuroynni enn í landinum sum heild

Um talið av parta- og smápartafeløgum í Suðuroynni verður samanborið við talið av parta- og smápartafeløgum í landinum sum heild, so eru tað lutfalsliga færri feløg í Suðuroynni, um fólkatalið verður brúkt sum eitt barometur (sí eisini talvu 2 niðanfyri).

| Ár | Suðuroy | Føroyar |
|---|---|---|
| 2000 | 5 | 160 |
| 2001 | 7 | 186 |
| 2002 | 16 | 194 |
| 2003 | 21 | 214 |
| 2004 | 19 | 185 |
| 2005 | 14 | 236 |
| 2006 | 34 | 433 |
| **Stovnaði tilsamans í tíðarskeiðinum 2000-2006** | **116** | **1.608** |
| **%-víst** | **7,2%** | |
| **Parta- og smápartafeløg tils.** | 210 | 2.465 |
| **%-víst** | 8,5% | |
| **Fólkatal í miðal 2000-2006** | 5.029 10,6% | 47.300 |

**Talva 2. PF og S/PF Stovnaði í Suðuroy og Føroyum árini 2000 – 2006.**
*Kelda: Skráseting Føroya, Januar 2007.*

Frá ársbyrjan 2000 til árslok 2006 blivu stovnað 116 parta- og smápartafeløg í Suðuroy. Í landinum sum heild vórðu í sama tíðarskeiði stovnað 1.608 feløg. Hetta merkir, at av samlaðu tilgongdini av feløgum í árunum 2000 til 2006, vóru umleið 7% heimahoyrandi í Suðuroynni. Í hesum sambandi kann nevnast, at í árunum frá 2000 til 2006 var fólkatalið í Suðuroynni í miðal 11% av fólkatalinum í Føroyum. Við árslok 2006 var talið av skrásettum parta- og smápartafeløgum í Føroyum 2.465. Harav vóru 211 feløg skrásett í Suðuroy svarandi til umleið 8,5% av samlaða talinum av feløgum í Føroyum.

Umroknað til tal av stovnaðum feløgum pr. 1.000 íbúgvar vórðu tað í 2006 stovnaði 6,87 feløg pr. 1.000 íbúgvar í Suðuroynni. Sama talið fyri alt landið var 8,98 feløg pr. 1.000 íbúgvar. Hetta er eisini ein staðfesting av, at tað í 2006 blivu stovnaði lutfalsliga færri feløg í Suðuroy enn í Føroyum sum heild.

Umframt at hyggja at, hvussu nógv feløg eru stovnað og innan hvørjar vinnur, hesi feløg virka, so er tað eisini áhugavert at hyggja nærri at, hvussu tað roknskaparliga hevur gingist hesum feløgum seinastu árini. Hetta verður gjørt í næsta parti.

# 4. Roknskapartøl fyri Suðuroy

Í hesum partinum verður hugt nærri at roknskapunum hjá parta- og smápartafeløgunum í Suðuroynni í tíðarskeiðinum frá 2002 til 2005. Hendan lýsingin er grundað á tilfar frá Business Line, umframt at egnar kanningar eru gjørdar. Vert er at leggja til merkis, at talið av parta- og smápartafeløgum hjá Business Line er nakað lægri enn talið hjá Skráseting Føroya. Orsøkin til hetta er, at Business Line er ein stovnur, sum skrásetir roknskapir hjá parta- og smápartafeløgum, meðan Skráseting Føroya skrásetir sjálva stovningina av parta- og smápartafeløgunum. Skrásetingin hjá Skráseting Føroya verður gjørd beinanvegin. Hinvegin kann tað í nógvum førum ganga eitt ár, áðrenn fyrsti roknskapurin hjá einum parta- ella smápartafelag verður latin inn, og tá verður felagið skrásett hjá Business Line. Ein onnur orsøk til ósamsvarið millum Business Line og Skráseting Føroya er, at feløg, sum eru steðgaði ella farin á húsagang (og tískil ikki hava latið inn roknskap fyri t.d. 2005) – ikki eru skrásett á Business Line sum virkin í 2005, men sum kortini framvegis eru í skipanini hjá Skráseting Føroya, inntil tey endiliga verða strikaði.

Við í lýsingini eru tilsamans uml. 150 feløg, sum eru bólkað á sama hátt sum í undanfarna parti, t.v.s. í 3 bólkar: *fiskivinna*, *handils- og tænastuvinna* og *ídnaðar- og handverksvinnan*. Alivinnan er tó ikki tikin við í bólkinum *fiskivinna*, men verður viðgjørd í einum sjálvstøðugum parti. Orsøkin er, at tølini fyri alivinnuna eru so stór og broytilig, at neyðugt er at halda tey uttan fyri annað yvirlit og viðgera tey fyri seg fyri ikki at grugga heildarmyndina.

## 4.1. Skiftandi úrslit í árunum 2002 - 2005

Í 2002 hevði vinnan í Suðuroynni[8] eitt avlop upp á umleið 20,4 mill. kr. áðrenn skatt. Fram til 2005 minkaði úrslitið við umleið 6,5 mill. kr., men í árunum frá 2002 til 2005 hava heilt stórar broytingar verið í samlaða úrslitinum hjá vinnuni í oynni. Sí eisini talvu 3 niðanfyri.

[8] Alivinnan og Suðuroyar Sparikassi eru sum nevnt ikki við í hesari uppgerðini.

| | 2002 | 2003 | 2004 | 2005 |
|---|---|---|---|---|
| Vinnan í sunnaru helvt | 438.000 | -8.896.000 | -4.275.000 | -1.041.000 |
| Vinnan í norðaru helvt | 19.970.000 | 11.940.000 | -10.378.000 | 14.974.000 |
| **Vinnan í Suðuroy tilsamans** | **20.408.000** | **3.044.000** | **-14.653.000** | **13.933.000** |

**Talva 3. Úrslit áðrenn skatt hjá vinnuni í Suðuroy í árunum 2002-2005.**
Viðm. Alivinnan og Suðuroyar Sparikassi eru ikki roknað við í yvirlitinum.

*Keldur: Business Line og egnar kanningar.*

## Árini 2002 og 2003

Um hugt verður nærri at úrslitunum hjá vinnuni í Suðuroynni í 2002, sum var eitt avlop á uml. 20,4 mill. kr. áðrenn skatt, so eru tað feløg í norðaru helvt av oynni, ið bera úrslitið hetta árið. Í 2002 hevði vinnan í norðaru helvt av oynni eitt avlop upp á smáar 20 mill kr., meðan úrslitið hjá vinnuni í sunnaru helvt var eitt avlop upp á umleið 0,4 mill. kr. Í norðaru helvt vóru tað serliga nøkur feløg innan fiskivinnuna á sjógvi og landi, sum høvdu góð úrslit. Í 2002 høvdu fleiri fyritøkur á Tvøroyri, sum virka innan handil- og tænastuvinnuna, eisini góð úrslit. Í sunnaru helvt gav bæði fiskivinnan á landi og sjógvi og ídnaðar- og handverksvinnan hall í 2002; handils- og tænastuvinnan hevði tó eitt avlop.

Frá 2002 til 2003 minkaði úrslitið áðrenn skatt við umleið 17,4 mill. kr., so at samlaða úrslitið hjá parta- og smápartafeløgum í Suðuroynni áðrenn skatt í 2003 var umleið 3,0 mill. kr. Minkingin er umleið 9,3 mill. kr. í sunnaru og umleið 8,0 mill. kr. í norðaru helvt av oynni. Vinnan í sunnara helvt hevði eitt hall upp á umleið 8,9 mill. kr., meðan vinnan í norðara helvt hevði eitt avlop upp á umleið 11,9 mill. kr. áðrenn skatt. Orsøkin til minkingina í avlopinum hjá vinnuni í norðaru helvt eru versnandi úrslit innan allar vinnubólkar. Hetta var eisini galdandi í sunnaru helvt av oynni, har tó serliga fiskivinnan (undir einum) hevði stórt hall.

## Árið 2004

Í 2004 versnaði samlaða úrslitið áðrenn skatt við meiri enn 17,6 mill. kr., soleiðis at árið 2004 gav eitt hall upp á umleið 14,7 mill. kr. Tað er serliga vinnan í norðaru helvt, sum hevur eitt vánaligt ár. Frá 2003 til 2004 versnaði úrslitið áðrenn skatt við meiri enn 22,3 mill. kr., frá einum avlopi í 2003 upp á uml. 11,9 mill. kr. til eitt hall upp á uml. 10,4

mill. kr. í 2004. Vánaliga úrslitið í norðaru helvt stavar serliga frá vánaligum úrslitum í fiskivinnuni á Tvøroyri, galdandi fyri bæði fiskivinnuna á sjógvi og landi. Fiskivinnan í Hvalba hevði samanlagt eitt avlop, hóast einstakar fyritøkur høvdu hall.

Hóast vinnan í sunnaru helvt av Suðuroy hevði eitt hall upp á umleið 4,3 mill. kr. í 2004, so var talan um ein bata í mun til úrslitið í 2003, tí hallið minkaði úr umleið 8,9 mill. kr. í 2003 niður í umleið 4,3 mill. kr. í 2004. Batin stóðst av einum minkandi halli í fiskivinnuni og einum avlopi í ídnaðar- og handverksvinnuni.

**Árið 2005**

Frá 2004 til 2005 broyttist tølini aftur munandi, men í mun til undanfarna ár, so var broytingin tann rætta vegin og hevði vinnan í 2005 eitt avlop áðrenn skatt uppá uml. 13,9 mill. kr. Sostatt er samlaða broytingin í úrslitinum áðrenn skatt frá 2004 til 2005 upp á uml. 28,6 mill. kr. – frá uml. 14,6 mill. kr. í halli í 2004 til uml. 13,9 mill. kr. í avlopi í 2005.

Tann stóra broytingin – til tað betra – frá 2004 til 2005 er, at úrslitið hjá vinnuni í norðaru helvt broyttist frá einum halli upp á meiri enn 10,3 mill. kr. í 2004 til eitt avlop áðrenn skatt upp á knappliga 15,0 mill. kr. í 2005. Orsøkirnar til broytingina eru tvinnar. Fyri tað fyrsta er úrslitið hjá fiskivinnuni í Hvalba munandi betri í 2005 enn í 2004. Í 2004 var úrslitið hjá fiskivinnuni í Hvalba áðrenn skatt umleið 3,6 mill. kr., meðan úrslitið í 2005 var umleið 12,3 mill. kr. – ein vøkstur upp á 8,7 mill. kr. Í øðrum lagi batnaði úrslitið hjá fiskivinnuni á Tvøroyri munandi frá 2004 til 2005, frá einum halli upp á uml. 20,1 mill. kr. í 2004 til eitt hall upp á uml. 3,4 mill. kr. í 2005.

Úrslitið hjá vinnuni í sunnaru helvt batnar eisini frá 2004 til 2005, men í 2005 hevði vinnan í sunnaru helvt av oynni framvegis eitt hall upp á umleið 1,0 mill. kr. í mun til 4,3 mill. kr. í halli í 2004.

## 4.2. Óstøðug gongd hjá vinnuni í Suðuroy

Í hesum partinum verður hugt nærri at, hvussu gongdin í teimum ymisku vinnubólkunum – fiskivinnuni, handils- og tænastuvinnuni, og ídnaðar- og

handverksvinnuni – hevur verið árini 2002 til 2005. Eins og í undanfarna parti verður víst á gongdina í Suðuroynni sum heild, umframt at skilt verður millum norðaru og sunnaru helvt av oynni.

#### 4.2.1. Fiskivinnan

Fiskivinnan er tann týdningarmesta privata vinnan í Suðuroynni, bæði hvat viðvíkur lønarútgjaldingum og tali av arbeiðsfólki. Í 2005 vórðu tað tilsamans rindaðar umleið 493 mill. kr. í lønum til fólk búsitandi í Suðuroynni (Hagstova Føroya).

| | **Lønarútgjaldingar í 1.000 kr.** | **Í prosentum av samlaðu lønarútgjaldingunum** |
|---|---|---|
| Fiskiskapur | 120.743 | 24,5% |
| Fiskavøruídnaður | 38.192 | 7,7% |
| Ali- og kryvivirki | 4.300 | 0,9% |
| *Fiski- og alivinnan tilsamans* | *163.235* | *33,1%* |
| **Lønarútgjaldingarnar í Suðuroy tilsamans** | **492.986** | **100,0%** |

**Talva 4. Lønir í Suðuroy í útvaldum vinnubólkum í 2005, í 1.000 kr. og í prosentum.**
*Kelda: Hagstova Føroya.*

Av samlaðu lønarútgjaldingunum í 2005, vóru umleið 120,7 mill. kr. – ella 24,5% - útgoldnar til suðringar, sum eru fiskimenn/-kvinnur[9]. Í 2005 vóru tað hinvegin bert umleið 15,5% av løntakarunum í Suðuroynni - sum vóru í vinnu - sum virkaðu innan fiskiskap. Við øðrum orðum so forvunnu lutfalsliga fá fólk (fiskimenn/-kvinnur) ein lutfalsliga stóran part av lønunum, sum vórðu útgoldnar í Suðuroynni í 2005. Støðan innan fiskavøruídnaðin og alivinnuna (undir einum) var hin øvugta. Meðan 8,6% av lønunum vórðu goldnar innan hesar vinnur, virkaðu heili 12,7% av løntakarunum innan fiskivinnuna á landi og í alivinnunu.

[9] Hetta talið fevnir eisini um suðringar, sum sigla við fiskiskipum, sum ikki eru heimahoyrandi í Suðuroynni.

Í 2005 vóru 33,1% av lønunum, sum vórðu útgoldnar til suðringar, goldnar innan fiskivinnuna (bæði fiskiskap, fiskavøruídnað og alivinnu), meðan tað tilsamans vóru 28,2% av løntakarunum, sum arbeiddu í fiskivinnuna hetta árið (Hagstova Føroya).

## Roknskapartøl fyri fiskivinnuni

Gongdin innan fiskivinnuna í Suðuroynni – sum fevnir um bæði framleiðslu á flaka- og fiskavirkjum á landi og um fiskiskap[10] – hevur verið rættiliga skiftandi árini 2002 til 2005. Sí eisini talvuna niðanfyri.

| | 2002 | 2003 | 2004 | 2005 |
|---|---|---|---|---|
| Fiskiskapur | 8.082.000 | 8.975.000 | -13.278.000 | 1.288.000 |
| Fiskavøruídnaður[11] | 3.231.000 | -9.744.000 | -9.312.000 | 330.000 |
| **Fiskivinnan í Suðuroy tilsamans** | **11.313.000** | **-769.000** | **-22.590.000** | **1.618.000** |

**Talva 5. Úrslit áðrenn skatt hjá fiskivinnuni í Suðuroy, býtt á fiskiskap og fiskavøruídnað.**
*Keldur: Business Line og egnar kanningar.*

Umframt at gongdin hevur verið skiftandi í vinnuni sjálvari, so hevur gongdin í norðaru og sunnaru helvt av oynni eisini verið rættiliga ymisk í árunum 2002 til 2005.

| | 2002 | 2003 | 2004 | 2005 |
|---|---|---|---|---|
| Fiskivinnan í sunnaru helvt | -839.000 | -9.718.000 | -5.979.000 | -7.132.000 |
| Fiskivinnan í norðaru helvt | 12.152.000 | 8.949.000 | -16.611.000 | 8.750.000 |
| **Fiskivinnan í Suðuroy tilsamans** | **11.313.000** | **-769.000** | **-22.590.000** | **1.618.000** |

**Talva 6. Úrslit áðrenn skatt hjá fiskivinnuni í Suðuroy í árunum 2002-2005.**
*Keldur: Business Line og egnar kanningar.*

### 2002

Í 2002 hevði fiskivinnan í Suðuroy eitt avlop upp á umleið 11,3 mill. kr. Hetta avlop stavar millum annað frá einum avlopi hjá báðum hvalbiartrolarunum, Niels Paula og Steintór (meiri um hvalbiartrolararnir niðanfyri). Niels Pauli hevði eitt avlop upp á 2,9 mill. kr. áðrenn skatt í 2002, meðan Steintór hevði góðar 1,6 mill. kr. í avlopi. Umframt

[10] Í roknskapartølunum eru eisini tikin við íløgufeløg, sum bert eru virkin innan fiskivinnuna.
[11] Faroe Seafood, sum hevur flakavirkir á Tvøroyri og í Vági, er ikki við í yvirlitinum.

hvalbiartrolararnir so hevði fiskavirkið Delta Seafood á Tvøroyri eisini eitt gott ár í 2002, tá avlopið áðrenn skatt var 2,9 mill. kr. Somuleiðis høvdu tey flestu feløgini innan fiskiskap á Tvøroyri eisini eitt gott ár í 2002.

**Delta Seafood**
Í 1995 byrjaði Delta Seafood at framleiða fiskavørur á Tvøroyri. Upp á stutta tíð hevur Delta Seafood ment seg og telist í dag millum tey størstu feløgini innan fiskivinnuna á landi. Umframt virkið á Tvøroyri rekur Delta Seafood eisini flakavirki í Hvalba. Delta Seafood var eisini ein av stigtakarunum, tá flakavirkini í Skopun og heima á Sandi lótu upp aftur undir navninum Sandoy Seafood. Delta Seafood er framvegis stórur partaeigari í Sandoy Seafood, sum varð umskipað í 2005, tá nýggjur partapeningur eisini varð skotin inn í felagið. Eisini hevur Delta Seafood ávirkan á raksturin av Sandoy Seafood við tað, at stjórin í Delta Seafood eisini er stjóri í Sandoy Seafood(saman við øðrum stjóra).

Fiskivinnan í sunnaru helvt í Suðuroy hevði undir einum eitt hall upp á 0,8 mill. kr. í 2002, hetta orsaka av halli hjá virkjum á landi og hjá fiskiskipunum. Tó var onkur glotti at hóma, m.a. hevði Palm Seafood eitt avlop upp á uml. 1,6 mill. kr. í 2002.

**2003**

Úrslitið hjá fiskivinnuni í sunnaru helvt av Suðuroy versnaði munandi frá 2002 til 2003, tá fiskivinnan í sunnaru helvt hevði eitt hall uppá 9,7 mill. kr. Fleiri av teimum stóru fyritøkunum á landi í Vági - Palm Seafood, Faroe Cold Stores og Sancy Seafood - høvdu hetta árið stórt hall, samstundis sum partrolararnir hjá PF Tvøran høvdu eitt vánaligt ár.

Úrslitið hjá fiskivinnuni í norðaru helvt av oynni í 2003 var hinvegin eitt avlop upp á 8,9 mill. kr. Aftur her er tað serliga PF Steintór í Hvalba – sum í januar 2003 eisini keypti djúpvatnstrolaran Sjagaklett – ið ávirkar samlaða úrslitið rætta vegin. Samanlagt høvdu djúpvatnstrolararnir Steintór og Sjagaklettur[12] eitt avlop upp á umleið 7,0 mill. kr. í 2003. Hin hvalbiartrolarin, Niels Pauli, hevði eitt avlop upp á 1,4 mill. kr. Hinvegin høvdu Suðurís og Íløgufelagið í Hvalba – sum tá róku og áttu flakavirkið í Hvalba – hall orsaka av einum vánaligum ári á flakavirkinum. Íløgufelagið í Hvalba eigur

[12] Orsøkin til, at Steintór og Sjagaklettur verða viðgjørdir saman, er, at Steintór eigur allan partapeningin í Sjagakletti, og ein partur av árliga úrslitinum hjá PF Steintór stavar frá PF Sjagaklettur.

partapeningin í PF Flakavirkið í Hvalba, sum leigar út sínar ognir (flakavirkið í Hvalba), í 2003 og 2004 til Suðurís, men í 2005 til TG Seafood (meira um TG Seafood niðanfyri).

Fiskivinnan á Tvøroyri – bæði á sjógvi og landi – hevði samanlagt avlop í 2003; einstøk undantøk vóru tó, m.a. hevði djúpvatnstrolarin Rankin eitt vánaligt ár í 2003.

**2004**

2004 var eitt sera vánaligt ár hjá fiskivinnuni í Suðuroynni sum heild. Vinnan hevði samanlagt eitt hall upp á 22,6 mill. kr. Í norðaru helvt var hallið umleið 16,6 mill. kr., meðan hallið í sunnaru helvt var umleið 6,0 mill. kr.

Høvuðsorsøkin til vánaligu gongdina í norðaru helvt var hall í fiskivinnuni á landi og sjógvi á Tvøroyri – hetta var galdandi fyri øll feløg, undantikið Klesin, sum tá átti línuskipið Grana[13]. Góða gongdin í Hvalba í 2003 helt tó í ávísan mun áfram í 2004, tá Steintór og Sjagaklettur samanlagt høvdu avlop upp á 4,0 mill. kr.. Niels Pauli hevði tó eitt lítið hall hetta árið.

Í sunnaru helvt av oynni høvdu at kalla allar fyritøkur innan fiskivinnuna hall í 2004. Tó hevði felagið Moyggjartúgva, sum í 2004 átti djúpvatnstrolararnar Roc Amadour og Sancy[14], eitt avlop upp á umleið 0,4 mill.

**2005**

Gongdin í fiskivinnuni í Suðuroynni broyttist munandi frá 2004 til 2005. Frá at vinnan samanlagt hevði eitt hall upp á umleið 22,6 mill. kr. í 2004, hevði vinnan í 2005 eitt avlop upp á umleið 1,6 mill. kr. Úrslitið var sostatt góðar 24 mill. kr. betri í 2005 enn í 2004.

Høvuðsorsøkin til broytingina er, at fiskivinnan í Hvalba hevði eitt sera gott ár í 2005. Steintór og Sjagaklettur høvdu samanlagt eitt avlop upp á 12,0 mill. kr. í 2005. Í 2005

[13] Línuskipið Grani varð í Januar 2006 selt til Klaksvíkar (Kelda: Suðurrás).
[14] Í 2006 seldi PF Moyggjartúgva bæði Roc Amadour og Sancy. Í báðum førum eru trolararnir seldir til feløg í Vági.

varð virksemið á flakavirkinum í Hvalba umskipað, soleiðis at TG Seafood[15] tók yvir virksemið. Í 2005 hevði TG Seafood eitt lítið avlop. Íløgufelagið í Hvalba hevði eisini í 2005 eitt avlop upp á góðar 0,9 mill. kr.

Fiskivinnan á Tvøroyri hevði sum heild eitt hall í 2005 Tó hevði Delta Seafood eitt avlop upp á umleið 1,0 mill. kr. og somuleiðis hevði PF Klesin, eitt avlop upp á 0,3 mill. kr.

Fiskivinnan í Vági hevði eisini sum heild eitt hall í 2005, undantikið Palm Seafood, Løðhamar Seafood og uppboðssølan Fløgan, sum samanlagt høvdu eitt avlop upp á uml. 1,3 mill. kr. Virksemið á Palm Seafood steðgaði í 2003 og byrjaði ikki rættiliga aftur fyrr enn á sumri 2006. Í 2005 varð Palm Seafood tó umskipað og nýggir eigarar tóku yvir. Orsøkin til avlopið á roknskapinum hjá Palm Seafood í 2005 er søla av ymiskum ognum. Virksemið á Palm Seafood í 2006 fevndi um framleiðslu av klippfiski, saltfiski og feskum fiski.

**Fiskivinnan í Hvalba ein fyrimynd**
Árini 2002 til 2005 hava verið rættiliga skiftandi hjá fiskivinnuni í Suðuroynni. Gongdin í Vági og á Tvøroyri hevur verið rættiliga óstøðug, meðan gongdin hjá fiskivinnuni í Hvalba – serliga hjá djúpvatnstrolarunum – hevur verið javnt góð.

Mitt í 1980unum keyptu hvalbingar tveir djúpvatnstrolarar, Niels Paula í 1983 og Steintór í 1985, sum síðan at kalla á hvørjum ári hava verið millum teir bestu trolararnir undir Føroyum. Hóast hetta so vórðu hvalbiartrolararnir eisini raktir av búskaparkreppuni fyrst í 1990unum, men eitt samtak í Hvalba setti í 1992 nýggjan pening í trolararnar, og á tann hátt vórðu feløgini styrkt. Hetta samtakið var samansett av mannskapi, arbeiðarafeløgum, kommununi og øðrum privatum íleggjarum. Samlaði innskotspeningurin í báðar trolararnar var umleið 4 mill. kr.

Síðani hevur ein miðvísur rakstur ár um ár eydnast væl. Við roknskaparlok 2005 høvdu báðir trolararnir eina samlaða eginogn uppá 40 mill. kr., ið er 10 ferðir eginognina í 1992. Serliga hjá Steintór hevur gingist væl. Orsøkin til positivu gongdina er ivaleyst at finna í dugnaskapi og ”know how”, ikki bert hjá leiðsluni, men eisini á brúnni, í maskinrúminum, á dekkinum og í lastini. Málið hjá hvørjum einstøkum hevur verið at fáa so nógv burtur úr sum gjørligt, við at maksimera inntøkurnar og minimera útreiðslurnar.

*(Framhald)*

[15] TG Seafood varð umskipað í apríl 2005 við einum breiðum eigaraskara, sum fevnir um djúpvatnstrolararnir í Hvalba, arbeiðsmannafeløg í Hvalba, íløgufeløg bæði í Hvalba, Suðuroynni og í Havn, Delta Seafood á Tvøroyri og onnur.

*(Framhald)*

Umframt at partafeløgini, ið eiga og reka trolararnar hava megnað at skapt eitt fíggjarligt grundarlag í feløgunum sjálvum, hava feløgini eisini verið virkin sum íleggjarar í øðrum vinnum. Til dømis keypti PF Steintór um aldaskiftið fiskiloyvi hjá djúpvatnstrolaranum Beintu av Tvøroyri, og í 2003 kom trolarin Sjagaklettur til landið upp á hetta fiskiloyvið.

Eisini hava trolararnir gjørt íløgur í fiskivinnuna á landi. Sum dømi kann nevnast PF Flakavirkið í Hvalba. Hetta felagið eigur ognina, ið fevnir um flakavirkið í Hvalba. Tey seinnu árini eru munandi íløgur gjørdar á virkinum, soleiðis at virkið í dag er eitt nýmótans flakavirki. Umframt PF Flakavirkið í Hvalba so hava hvalbiar-trolararnir eisini sett pening í PF TG Seafood. Hetta felagið hevur raksturin av Flakavirkinum um hendi. Aðrir aktørar í hesum felag eru m.a. Delta Seafood á Tvøroyri.

Somuleiðis hava trolararnir eisini sett pening í alternativar vinnur. Ein tann mest áhugaverda íløgan er helst íløgan í toskaaling í Nesi í Hvalba. Á heysti í 2006 vóru tey stóru kørini, sum alast skulu í, klár, og smolt varð sett út í januar 2007 (Suðuroyarportalurin, 30. Januar 2007 – www.sudurras.com).

Eisini óbeinleiðis hava trolararnir og fiskivinnan í Hvalba sum heild stóran týdning fyri lokaløkið og fyri Suðuroynna. Nógvir tænastuveitarar í Suðuroynni hava lagt seg eftir at veita vørur og tænastur til fiskiskip, t.d. trolvirkið Bergið í Hvalba, umframt aðrir tænastuveitarar innan el, rør og jarnsmíð o.s.fr. Hartil hava trolararnir eisini stóran týdning fyri Hvalbiar kommunu, sum fær ein munandi part av síni skattainntøku frá trolarunum og fiskivinnuni í Hvalba.

**2006**

Í 2006 fóru fram stórar broytingar í fiskivinnuni í Suðuroynni. Og hóast roknskapartøl ikki verða tøk fyrr enn einaferð seinni í 2007, so eru tað tó nakrar ábendingar um, hvussu gongdin hevur verið. Góður fiskiskapur, høgir fiskaprísir og nógv virksemi á fiskavirkjunum bera boð um, at árið 2006 var betri enn 2005.

Í fiskivinnuni á landi hevur t.d. verið virksemi á flakavirkinum í Hvalba alt árið 2006. Á Tvøroyri hevur Delta Seafood – eins og undanfarin ár – eisini havt støðuga framleiðslu. Í Vági hevur aftur verið virksemi á Palm Seafood, umframt at virksemi eisini hevur verið á Løðhamar Seafood og JMA Seafood. Í Lopra fór fiskavirkið Kirvið undir framleiðslu á vári 2006, men hevur tó bert framleitt í stutt tíðarskeið í 2006.

Eisini hjá Føroya Fiskavirking í Suðuroynni hevur verið nógv virksemi í 2006. Arbeitt hevur verið við at fáa gongd á aftur flakavirkið í Vági, har tað ætlandi skal framleiðast góðskaðar fiskavørur av ymiskum slag. Á flakavirkinum hjá Føroya Fiskavirking á Tvøroyri er framleiðslan løgd um, soleiðis at tikið verður ímóti gulllaksi ein part av árinum.

Í 2006 eru eisini broytingar farnar fram í fiskiskipaflotanum í Suðuroynni. Nýstovnaða felagið Deep Fishing á Tvøroyri, sum felagið N. J. Mortensen á Tvøroyri eigur, keypti í 2006 garnaskipið Jónrit (av Toftum), sum nú eitur Drelnes. Í Vági vórðu báðir djúpvatnstrolararnir hjá PF Moyggjartúgvu – Roc Amadour og Sancy – seldir til tvey nýstovnað feløg í Vági. Í februar 2006 kom partrolarin Bliki – sum PF Tvøran í Vági eigur – í flotan fyri Nýborg, sum varð løgd og seinni seld av landinum. Í sambandi við broytingarnar í fiskiflotanum í Vági er eisini nýggjur partapeningur komin inn í vinnuna, so at vinnan við árslok 2006 helst er nakað sterkari enn við árslok 2005.

**N. J. Mortensen á Tvøroyri**
Felagið N. J. Mortensen (hereftir NJM) á Tvøroyri varð stovnað í 1911 og hevur síðan hetta verið ein týðandi aktørur í vinnulívinum á Tvøroyri. Fyrstu nógvu ártíggjuni fevndi virksemi bæði um fiskiskap, fiskaframleiðslu og handilsvirksemi. Men í tíðarskeiðinum frá 1960árunum og frameftir legði felagið seg serliga eftir at reka skip og handlar (matvøru- og klædnahandil).

Týdningurin av NJM í lokala vinnulívinum í Suðuroynni er og hevur altíð verið sjónligur. Og í dag telist NJM millum týdningarmestu fyritøkur í oynni. Umframt at eiga ein stóran handils- og skrivsstovubygning á Tvøroyri, har fyritøkan bæði leigar út og sjálv rekur handil, so eigur NJM eisini heilt ella partvíst fleiri skip. NJM eigur allan partapeningin í PF Vørðan, sum eigur djúpvatnstrolaran Rankan. NJM eigur eisini allan partapeningin í PF Deep Fishing, sum eigur garnaskipið Drelnes, ið felagið keypti í 2006. Harumframt er NJM týðandi partaeigari í felagnum Deep Sea Ltd., sum eigur djúpvatnstrolaran Rasmus Effersøe og garnaskipið Nim. NJM stendur fyri rakstrinum av øllum skipunum.

### *4.2.2. Handils- og tænastuvinnan*

Í 2005 vórðu tilsamans 69,3 mill. kr. goldnar í lønum til suðringar búsitandi í Suðuroy, sum virkaðu innan handils- og tænastuvinnuna. Hetta svarar til 14,1% av samlaðu lønunum, sum vórðu útgoldnar til suðringar í 2005. Í 2005 arbeiddu umleið 17,0% av teimum suðringum, sum vóru í vinnu, innan handils- og tænastuvinnuna.

## Roknskapartøl fyri handils- og tænastuvinnuna

Handils- og tænastuvinnan í Suðuroy hevði øll árini frá 2002 til 2005 eitt avlop. Samlaðu tølini eru tó lutfalsliga smá og minkandi. Avlopið áðrenn skatt í 2002 var 7,3 mill. kr. Avlopið minkar við út við einari helvt í 2003 – tá avlopið var 3,6 mill. kr. – hetta einamest orsakað versnandi úrslitum í handils- og tænastuvinnuni í norðari helvt. Úrslitið í 2004 var uml. 5,0 mill. kr. áðrenn skatt, meðan úrslitið hjá handils- og tænastuvinnuni í 2005 var 3,1 mill. kr. Sí eisini talvu 7. niðanfyri.

Sæð yvir alt tíðarskeiðið er gongdin mest sum tann sama í sunnaru- og norðaru helvt av oynni: Úrslitið áðrenn skatt minkar við umleið eini helvt ella meira frá 2002 til 2005.

| | **2002** | **2003** | **2004** | **2005** |
|---|---|---|---|---|
| Handils- og tænastuvinnan í sunnaru helvt | 2.438.000 | 2.279.000 | 1.145.000 | 1.230.000 |
| Handils- og tænastuvinnan í norðaru helvt | 4.821.000 | 1.328.000 | 3.836.000 | 1.828.000 |
| **Handils- og tænastuvinnan í Suðuroy tilsamans** | **7.259.000** | **3.607.000** | **4.981.000** | **3.058.000** |

**Talva 7. Úrslit áðrenn skatt hjá handils- og tænastuvinnuni í Suðuroy í árunum 2002-2005.**
*Keldur: Business Line og egnar kanningar.*

Avlopið hjá handils- og tænastuvinnuni í Suðuroynni minkar við fleiri enn 4 mill. kr. í tíðarskeiðinum frá 2002 til 2005. Ein av orsøkunum til minkingina er helst økt kapping frá handils- og tænastuvinnuni í miðstaðarøkinum. Fólk í Suðuroynni gera (eisini) alsamt meiri nýtslu av tilboðum frá handils- og tænastuvinnuni í miðstaðarøkinum. Tey nógvu tilboðsbløðini við lágprísvørum, sum hvørja viku verða borin í hvørt hús í landinum, hava uttan iva ávirkan á í hvønn mun suðringar keypa frá handilsfyritøkum aðrastaðni. Hartil gerst tað alsamt lættari at handla umvegis telefon og/ella internet, umframt at tað eisini eru góðir møguleikar fyri at keypa norðanfjørðs og fáa vøruna latna við dyrnar av sokallaðum door-to-door flutningsfeløgum. Harumframt tykist tað, sum suðringar eisini í alsamt vaksandi mun ferðast til Havnar í handilsørindum. Hesi viðurskifti hava sjálvsagt ávirkan á handils- og tænastuvinnuna í Suðuroynni.

**Avmarkaðir vakstrarmøguleikar**

Við tað at handils- og tænastuvinnan í Suðuroynni í stóran mun bert hevur Suðuroynna sum marknað, so eru vakstrarmøguleikarnir eisini avmarkaðir. Hetta er í øllum førum galdandi fyri tann partin av vinnuni, sum ikki hevur møguleika at bjóða seg fram í øðrum pørtum av landinum. Partar av handils- og tænastuvinnuni hava tó møguleika fyri at bjóða seg fram í øðrum pørtum av landinum. Men við tað, at tað í t.d. høvuðsstaðarøkinum frammanundan eru nógvar sterkar fyritøkur innan hesa vinnu, so er tað ikki lætt at koma inn á marknaðin. Hetta ger helst eisini, at handils- og tænastufyritøkur í Suðuroynni eru afturhaldandi, tá tað ræður um at fara inn á marknaðin í restina av landinum.

Umframt at bjóða seg fram á øðrum marknaðum í landinum, so er tað eisini ein vakstrarmøguleiki hjá handils- og tænastuvinnuni, at talið av ferðandi til Suðuroynna økist. Ein øking í talinum av ferðandi hevur beinleiðis ávirkan á ferðavinnuna í oynni, men harumframt eisini avleidda ávirkan á aðrar handils- og tænastuvinnur. Í so máta er ferðavinnan ein vinna, har handils- og tænastuvinnan í Suðuroynni hevur hampiliga vakstrarmøguleikar í komandi tíðum.

**Ferðavinnan í vøkstri**

Talið av ferðandi um Suðuroyarfjørð er vaksið nógv tey seinastu árini. Í 2006 var talið av ferðandi 193.060, og í mun til 2004 (tá gamli Smyril sigldi alt árið) er talan um ein vøkstur uppá 38.618 fólk, svarandi til ein vøkstur uppá 25% (Strandfaraskip Landsins, Januar 2007). Vøksturin er uttan iva ávirkaður av, at nýtt Suðuroyarskip fór í sigling í oktober 2005. Ætlanirnar um eina øking í túratalinum hjá Smyrli, soleiðis at Smyril fer at sigla 3 túrar um dagin nakrar dagar um vikuna, fara uttan iva eisini at føra við sær eina øking í talinum av ferðandi um Suðuroyarfjørð.

Um hotelvirksemi í Suðuroynni verður brúkt sum barometur fyri gongdini hjá ferðavinnuni, so eru eisini ábendingar um, at ferðavinnan í Suðuroynni er í ávísum vøkstri. Undir einum hava hotellini (Hotel Tvøroyri, Hotel Øravík og Hotel Bakkin í Vági) havt eitt avlop árini 2002 til 2005, men eru tað serliga Hotel Øravík og Hotel Tvøroyri, sum hava góð úrslit. Hotel Bakkin í Vági hevði eitt avlop í 2005, men hevði

hini árini eitt lítið hall. Í 2004 og í 2005 hevði Hotel Øravík góð ár við avlopi upp á umleið 0,4 mill. kr. áðrenn skatt í 2004 og 2005. Hotel Tvøroyri hevði í 2005 eitt avlop áðrenn skatt upp á góðar 0,2 mill. kr.

Umframt at úrslitini hjá hotellunum í oynni er eitt barometur, so boða Kunningarstovurnar í oynni eisini frá øktum ferðafólkatali tey seinastu árini. Talan er serliga um eina øking í talinum av føroyingum, sum ferðast og gista (antin á hotellum ella í leigaðum húsum/íbúðum) í Suðuroynni (Kelda: Kunningarstovan í Vági, Januar 2007).

### 4.2.3. Ídnaðar- og handverksvinnan

Í 2005 vórðu tilsamans 62,1 mill. kr. goldnar í lønum til fólk búsitandi í Suðuroy, sum virkaðu innan ídnaðar- og handverksvinnuna. Hetta svaraði til 12,6% av samlaðu lønunum, sum vórðu útgoldnar til suðringar í 2005. Í 2005 arbeiddi umleið 15,5% av suðringunum, sum vóru í vinnu, innan ídnaðar- og handsverksvinnuna.

#### Roknskapartøl fyri ídnaðar- og handverksvinnuna

Hjá ídnaðar- og handsverkvinnuni í Suðuroynni veksur úrslitið áðrenn skatt munandi í árunum 2002 til 2005. Frá einum úrsliti upp á uml. 1,8 mill kr. í 2002 fer úrslitið upp uml. 9,3 mill. kr. í 2005. Gongdin í norðaru helvt av oynni hevur verið góð øll árini frá 2002 til 2005, meðan gongdin í sunnaru helvt av oynni er vend frá einum halli til eitt avlop. Bæði í 2002 og 2003 hevði vinnan í sunnaru helvt eitt hall, men so kemur vend í í 2004, og í 2005 hevði vinnan eitt avlop upp á uml. 4,9 mill. kr. Hetta árið hevði vinnan í norðaru helvt eitt avlop upp á uml. 4,4 mill. kr.

| | 2002 | 2003 | 2004 | 2005 |
|---|---|---|---|---|
| Ídnaðar- og handverksvinnan í sunnaru helvt | -1.161.000 | -1.457.000 | 559.000 | 4.861.000 |
| Ídnaðar- og handverksvinnan í norðaru helvt | 2.997.000 | 1.663.000 | 2.397.000 | 4.396.000 |
| **Ídnaðar- og handverksvinnan í Suðuroy tilsamans** | **1.836.000** | **206.000** | **2.956.000** | **9.257.000** |

**Talva 8. Úrslit áðrenn skatt hjá ídnaðar- og handverksvinnuni í Suðuroy í árunum 2002-2005.**
*Keldur: Business Line og egnar kanningar.*

Ein av orsøkunum til betraðu gongdina er helst, at fyritøkur innan ídnaðar- og handverksvinnuna í Suðuroy hava tikið upp kappingina við aðrar partar av landinum, og hava eisini í størri mun megnað at fáa lut í økta virkseminum, sum er í samfelagnum í løtuni. Handverksvinnan í Suðuroynni[16] tykist hava vant seg við at "viku-pendla" og "mánaðar-pendla" – í 1 viku frá mánamorgni til tórskvøld til miðstaðarøkið, og í 4-6 vikur uttanlands. Við øðrum orðum hevur ein partur av handverksvinnuni í Suðuroynni lagt seg eftir at ferðast eftir arbeiði aðrastaðni og á tann hátt fáa part í øktum virksemi, antin aðrastaðni í landinum ella uttanlands. Vanligt er, at hesir løntakarar arbeiða nógvar tímar um dagin, hartil er tímalønin ofta hægri, og mánaðarlønin tískil góð. Skipanin við dag-viðbótum ger tað eisini meiri lokkandi at taka av arbeiðstilboðum, sum føra við sær, at ein er uttan fyri Suðuroynna í arbeiðsørindum í styttri og longri tíðarskeið.

Tær stóru almennu íløgurnar í t.d. infrakervi í oynni hava í ávísan mun eisini økt um virksemi hjá fyritøkum innan ídnaðar- og handverksvinnuna, hóast høvuðsarbeiðstakarin í flestu førum hevur verið størri fyritøkur uttanífrá. Harumframt hava einstakar stórar privatar og kommunalar íløgur tey seinastu 3-5 árini ført við sær økt virksemi hjá ídnaðar- og handsverksfyritøkum í oynni.

Somuleiðis hava fleiri ídnaðar- og handverksfyritøkur í Suðuroynni lagt seg eftir ávísum marknaðum og á tann hátt havt støðugan rakstur og støðuga framgongd. Ein av hesum fyritøkunum er Trolvirkið Bergið í Hvalba.

**Trolvirkið Bergið í Hvalba góð ár 2002-2005**
Trolvirkið Bergið í Hvalba framleiðir alt slag av fiskireiðskapi til trolarar. Bergið hevði øll árini frá 2002 til 2005 góð rakstrarúrslit. Tilsamans er talan um avlop áðrenn skatt upp á góðar 3,8 mill. kr. í tíðarskeiðinum frá 2002 til 2005. Trolvirkið Bergið hevur einamest lagt seg eftir at veita tænastur til trolararnar í oynni – hetta við góðum úrslitum. Um ársskiftið 2005/2006 keypti trolvirkið Vónin ein part av trolvirkinum Bergið.

[16] Bæði galdandi fyri handverkarar og ófaklærdar arbeiðsmenn innan timburarbeiði, hita og rør, jørð og betong, el, og málaraarbeiði.

*Støðugar fyritøkur á Tvøroyri*

Fyritøkurnar innan ídnaðar- og handverksvinnuna á Tvøroyri hava seinastu árini havt eina støðuga gongd, hóast nakrar fyritøkur hava havt sveiggj í roknskapinum. Til dømis høvdu at kalla allar fyritøkurnar innan hesar báðar vinnurnar á Tvøroyri eitt avlop í 2002, sum samanlagt var væl omanfyri 3 mill. kr. Í 2003 høvdu einstakar fyritøkur hall, sum samanlagt førdi við sær, at avlopið áðrenn skatt var undir 1 mill. kr. – úrslitið var á leið tað sama í 2004. Í 2005 gekk hinvegin munandi betri, tá ídnaðar- og handverksvinnan á Tvøroyri (sum í 2005 taldi tilsamans 15 parta- og smápartafeløg) – hevði meiri enn 3 mill. kr. í avlopi.

**Coma Pack undirveitari til feskfiskavinnuna**
Feskfiskavinnan í Suðuroynni, sum m.a. fevnir um útflutning av feskum fløkum og feskum heilum laksi, tók rættiligt dik á seg síðst í 1980árunum og fyrst í 1990árunum. Vøksturin í vinnuni førdi við sær stóran tørv á sokallaðum "flamingokassum", sum fløk og heilur fiskur verða ísaði í. Ongin verulig framleiðsla av hesum flamingokassum var í Suðuroynni tá, tó hevði smiðjan hjá Vagn Mortensen á Tvøroyri eina lítla framleiðslu, men henda nøktaði ikki tørvin, og fevndi framleiðslan eisini bert um eina ávísa støðd av kassum.

Fyritøkurnar Sp/f Petur Hammer og P/F R.B. Thomsen á Tvøroyri sóu møguleikan í sambandi við stóra tørvin eftir flamingokassum og stovnaðu fyrst í 1990árunum felagið Coma Pack. Hetta felagið hevði til endamáls at framleiða flamingokassar í fleiri støddum. Framleiðslan á virkinum er tøkniliga framkomin, og hevur felagið síðan byrjan havt eina rímiliga gongd, sum tó altíð hevur verið nógv tengd at gongdini í fiskivinnuni á landi og á alivinnuni.

*Ídnaðar- og handverksfyritøkur í Vági eitt gott ár í 2005*

Størsta broytingin í úrslitinum áðrenn skatt hjá ídnaðar- og handverksvinnuni í Suðuroynni var frá 2004 til 2005, tá avlopið vaks úr 2,8 mill. kr. upp í 9,4 mill. kr. Vøksturin er serliga í sunnaru helvt, serliga í fyritøkum í Vági – og har eru tað nakrar fyritøkur, sum skilja seg burturúr.

Í 2005 hevði fyritøkan CN-bygg eitt avlop uppá umleið 2 mill. kr. áðrenn skatt. Fyritøkan hevur nógv virksemi innan byggivinnuna, men hevur harumframt eisini bilverkstað í Hovi. Fyritøkan hevur serliga lagt seg eftir byggivirksemi uttanlands og í miðstaðarøkinum. CN-Bygg hevur onki byggivirksemi í Suðuroynni. Seinastu árini hevur CN-Bygg staðið fyri fleiri stórum byggjaríum, m.a. stóð fyritøkan fyri byggingini

av handilsmiðstøðini Miðlon í Havn, og skal CN-Bygg eisini byggja handilsmiðstøðina í Gøtudali. Harumframt er fyritøkan eisini partur av fleiri øðrum størri byggjaríum norðanfjørðs (samrøða við Jón Nielsen, CN Bygg, í Okt. 2006).

Innan byggivinnuna er eisini ein nýggj fyritøka í Vági, HES-Byg, sum varð stovnað í apríl 2004. HES-Byg er ein fyritøka innan byggivinnuna, sum einamest hevur lagt seg eftir at gera byggiarbeiði í Danmark, serliga innan jørð- og betongarbeiði. Í ár (2007) fer HES-Byg eisini at gera arbeiðir í Føroyum og skulu teir m.a. (saman við øðrum) byggja nýggju handilsmiðstøðina í Klaksvík (samrøða við Heri Silvurdal, HES-Byg, í Okt. 2006). Í 2005 hevði HES-Byg eitt avlop á umleið 750.000 kr., hetta er nakað betri enn í 2004, tá fyritøkan hevði smáar 600.000 kr. í avlopi áðrenn skatt.

Ein onnur nýggj fyritøka, sum ávirkar roknskapartølini fyri ídnað og handverk í Vági í 2005 rætta vegin, er fyritøkan Rock í Vági. Rock framleiðir og umvælir trollemmar, umframt at fyritøkan eisini ger annað jarn- og sveisi- arbeiði. Fyritøkan Rock hevur framkomna skeriútgerð til at skera stál, og sker eisini nakað av stáli fyri aðrar fyritøkur í oynni, m.a. Vágs Skipasmiðju og Tangavirkið í Vági (samrøða við Hans J. Joensen, Rock, í Okt. 2006). Rock byrjaði virksemi í sept. 2004 og úrslitið á fyrsta roknskapinum, sum gekk fram til árslok 2005, var eitt avlop upp á umleið 1 mill. kr. áðrenn skatt.

Somuleiðis var árið hjá Vágs Skipasmiðju og Tangavirkinum í Vági eisini gott. Í 2005 hevði Vágs Skipasmiðja eitt avlop upp á góðar 500.000 kr., meðan Tangavirkið hevði eitt avlop upp á góðar 400.000 kr. áðrenn skatt.

**Ídnaðar- og handverksvinnan týdning fyri Suðuroynna**

Ídnaðar- og handverksvinnan hevur stóran týdning fyri Suðuroynna. Fyrst og fremst orsakað av, at hendan vinnan ikki er avmarkað til bara at fevna um Suðuroynna. Nógvar handverksfyritøkur í Suðuroynni arbeiða aðrastaðni í Føroyum og uttanlands, og á hendan hátt er hendan vinnan við til at skapa arbeiðspláss fyri suðringar, sum ikki eru beinleiðis ávirkaði av gongdini í Suðuroynni.

Eitt annað er, at virksemi hjá einum parti av lokalu handverksvinnuni ikki bara er treytað av at lokalum eftirspurningi, men í stóran mun tengt at eftirspurningi aðrastaðni í landinum og uttanlands. Hetta er m.a. galdandi fyri Trolvirkið Bergið í Hvalba, lemmavirkið Rock og Tangavirkið í Vági, umframt at ein munandi partur av virkseminum hjá Vágs Skipasmiðju fevnir um arbeiði upp á skip úr øðrum pørtum av landinum.

Í triðja lagi so hevur ídnaðar- og handverksvinnan týdning fyri ungdómin. Hetta á tann hátt, at hendan vinnan gevur ungdóminum møguleika fyri at fáa læupláss, og gevur sostatt ungdóminum møguleika fyri at fáa sær eina miðallanga útbúgving, uttan at hann noyðist av oynni ella av landinum. Talið av læruplássum er nógv knýtt at virkseminum í vinnuni. Í 2006 (fram til 30. sept. 2006) var ein tilgongd upp á 15 lærlingar í Suðuroynni. Fimm av hesum vóru innan byggivinnuna og fimm vóru innan metal / jarnsmíðsvinnuna. Tveir lærlingar eru innan el- og samskifti, meðan tveir eru handils- og skrivstovulærlingar; harumframt er ein lærlingur innan tænstu- og tilvirksiyrki (www.yrkisdepilin.fo). Samanborið við lærlingatalið í Føroyum sum heild er talið av lærlingum í Suðuroynni tó lágt. Fram til 30. sept. 2006 vórðu tað 6,4 lærlingar pr. 1.000 íbúgvar í Føroyum. Í Suðuroynni var talið 3,0 lærlingar pr. 1.000 íbúgvar[17].

At enda, so er ídnaðar- og handverksvinnan – eins og t.d. teir suðringar, sum sigla við útlendskum skipum – eisini í ávísan mun við til at draga kapital til Suðuroynna, sum verður brúktur av familjum í Suðuroynni, m.a. í smb. við keyp frá lokalu handils- og tænastuvinnuni.

### 4.2.4. Alivinnan

Í hesum partinum verður alivinnan viðgjørd sum ein sjálvstøðug vinna. Orsøkin er, at tølini hjá alivinnuni eru so stór og broytilig, umframt at alivinnan (fram til 2006[18]) bert

---

[17] Í Sandoyar Sýslu vóru tað 2,1 lærlingur pr. 1.000 íbúgvar; í Streymoyar Sýslu 7,5; í Vága Sýslu 7,5; í Eysturoyar Sýslu 6,0, og í Norðoya Sýslu 6,3 lærlingar pr. 1.000 íbúgvar (www.yrkisdepilin.fo).

[18] Í 2006 varð felag, Faroe Cod Farm, stovnað í Hvalba, sum hevur til endamáls at ala tosk. Felagið settið út toska yngul í Januar 2007 (Kelda: Suðurrás). Av tí at hetta felagið ikki er stovnað fyrr enn í 2006, so er felagið ikki við í roknskaparyvirlitinum í talvu 9.

er í sunnara parti av oynni. Stóru broytingarnar innan alivinnuna eru eisini sjónligar í talvuni niðanfyri.

| | 2002 | 2003 | 2004 | 2005 |
|---|---|---|---|---|
| Úrslit áðrenn skatt | -148.321 | 5.165 | -14.215 | -9.537 |
| Skuld | 281.866 | 1.822 | 42.607 | 27.797 |
| Eginogn | -55.200 | 6.700 | 26.956 | 29.718 |

**Talva 9. Roknskapartøl hjá alivinnuni í Suðuroy 2002-2005 (í 1.000 kr.).**
*Keldur: Business Line og egnar kanningar.*

Sum sæst var hallið í alivinnuni 148,3 mill. kr. í 2002. Árið eftir hevði alivinnan í oynni eitt avlop uppá 5,2 mill. kr., og eitt ár seinni, í 2004, hevði vinnan hall uppá 14,2 mill. kr. Í 2005 var hallið uml. 9,5 mill. kr. Orsøkin til stóru broytingarnar er, at í tíðarskeiðinum frá 2002 til 2005 steðgar alivinnan í oynni upp, fer síðani á húsagang og verður endurreist av nýggjum felagið.

Í tíðarskeiðinum frá 1999 til 2003 rak felagið Suðurlaks alivinnuna í Suðuroynni. Hetta felagið samstarvaði m.a. við norska felagið Panfish. Suðurlaks hevði – eins og vinnan í Føroyum sum heild – góðar vónir til alivinnuna og gjørdi nógvar íløgur bæði á sjógvi og landi. Men eins og við stórum pørtum av føroysku alivinnuni so førdi m.a. sjúka við sær, at Suðurlaks kom í kreppu og fór felagið á húsagang í 2002. Í 2003 keypti eitt nýtt felag í Vági, Faroe Farming, partar av alivirkseminum hjá Suðurlaks, og síðan hevur Faroe Farming staðið fyri laksa- og sílaalingini í Suðuroynni.

Skuldin hjá Suðurlaks var í 2002 góðar 281,9 mill. kr. – hetta var meiri enn skuldin hjá allari vinnuni í Suðuroynni[19] tilsamans í 2002. Eftir húsagang og endurreising minkaði skuldin hjá alivinnuni í Suðuroynni við 280 mill. kr. frá 2002 til 2003, fyri síðani at vaksa aftur til 42,6 mill. kr. í 2004. Skuldin minkaði aftur í 2005, tá skuldin var 27,8 mill. kr.

[19] Tá alivinnan og Suðuroyar Sparikassi ikki eru íroknaði.

Eginognin var í 2002 negativ við 55,2 mill. kr. Eftir húsagang varð nýggjur peningur settur í vinnuna í 2003, og síðani hevur eginognin verið positiv og var eginognin í 2005 positiv við 29,7 mill. kr.

Greitt er, at tað hevur verið tungt at fáa gongd aftur á alivinnuna í Suðuroy. Vinnan krevur stóra fíggjarliga orku, og ikki minst eru stór krøv til vitan fyri at kunna virka innan hesa vinnuna. Nýggju aktørarnir í laksa- og sílaalivinnuna í Suðuroynni hava vitanina og hava eisini megnað at skapa neyðuga fíggjarliga grundarlagið.

Umframt aling av laksi og sílum so er eitt felag í Hvalba – Faroe Cod Farm – eisini farið undir at ala tosk í kørum á landi. Toskayngul varð settur út í januar 2007, og er tað í skrivandi løtu (apríl 2007) ov tíðliga at siga, hvussu hendan verkætlanin fer at roynast.

## 4.3. Bruttovinningur

**Bruttovinningurin er tann partur av vinninginum, ið er eftir til m.a. starvsfólkakostnað.**

Um hugt verður at bruttovinninginum er gongdin hjá vinnuni í Suðuroynni tey seinastu 5 árini ikki góð. Í einum stuttum tíðarskeiði frá 2002 til 2004 minkaði bruttovinningurin við meiri enn 90 mill. kr. Talan er um eina minking uppá 30%. Tó vaks samlaði bruttovinningurin við uml. 42 mill kr. frá 2004 til 2005.

| | 2002 | 2003 | 2004 | 2005 |
|---|---|---|---|---|
| Vinnan í sunnaru helvt | 81.367.000 | 66.946.000 | 57.632.000 | 77.270.000 |
| Vinnan í norðaru helvt | 217.609.000 | 186.324.000 | 148.580.000 | 170.773.000 |
| **Vinnan í Suðuroy tilsamans** | **298.976.000** | **253.270.000** | **206.212.000** | **248.043.000** |

**Talva 10. Bruttovinningurin hjá vinnuni í Suðuroy í árunum 2002-2005.**
*Keldur: Business Line og egnar kanningar.*

Reella minkingin í norðaru helvt av Suðuroy var í árunum 2002 til 2004 uml. 70 mill. kr., svarandi til eina minking upp á 31%. Tó vaks bruttovinningurin aftur við umleið 22 mill. kr. frá 2004 til 2005. Í sunnaru helvt av oynni minkaði bruttovinningurin frá 81,4

mill. kr. í 2002 til 57,6 mill. kr. í 2004. Tó vaks bruttovinningurin aftur til 77,3 mill. kr. í 2005.

Bruttovinningurin er sum nevnt tann partur av vinninginum, ið er eftir til m.a. starvsfólkakostnað. Og tá bruttovinningurin minkar við uml. 50 mill. kr. frá 2002 til 2005, vil hetta alt annað líka ávirka starvsfólkakostnaðin.

Vert er at leggja til merkis, at bruttovinningurin í norðaru helvt er alt tíðarskeiðið knappliga 3 ferðir so stórur sum bruttovinningurin í sunnaru helvt. Hetta gevur greiðar ábendingar um, at vinnuliga gongdin í norðaru helvt er munandi betri enn í sunnaru helvt.

Um hugt verður eftir bruttovinninginum innan teir ymisku vinnubólkarnar kann staðfestast, at bruttovinningurin innan fiskivinnuna minkar nógv frá 2002 til 2005. Innan handilsvinnuna er bruttovinningurin støðugur, meðan bruttovinningurin hjá ídnaðar- og handverksvinnuni veksur nakað í árunum frá 2002 til 2005. Sí eisini niðanfyri.

### *4.3.1. Fiskivinnan*

| | 2002 | 2003 | 2004 | 2005 |
|---|---|---|---|---|
| Fiskiskapur | 174.289.000 | 136.773.000 | 101.786.000 | 127.041.000 |
| Fiskavøruídnaður | 33.686.000 | 21.064.000 | 12.901.000 | 22.485.000 |
| **Fiskivinnan í Suðuroy tilsamans** | **207.975.000** | **157.837.000** | **114.687.000** | **149.526.000** |

**Talva 11. Bruttovinningurin hjá fiskivinnuni í Suðuroy, býtt á fiskiskap og fiskavøruídnað.**
*Keldur: Business Line og egnar kanningar.*

| | 2002 | 2003 | 2004 | 2005 |
|---|---|---|---|---|
| Fiskivinnan í sunnaru helvt | 47.403.000 | 28.770.000 | 24.826.000 | 33.935.000 |
| Fiskivinnan í norðaru helvt | 160.572.000 | 129.067.000 | 89.861.000 | 115.591.000 |
| **Fiskivinnan í Suðuroy tilsamans** | **207.975.000** | **157.837.000** | **114.687.000** | **149.526.000** |

**Talva 12. Bruttovinningurin hjá fiskivinnuni í Suðuroy í árunum 2002-2005.**
*Keldur: Business Line og egnar kanningar.*

Bruttovinningurin hjá fiskivinnuni minkar við góðum 58 mill. kr. í tíðarskeiðinum frá 2002 til 2005. Men minkingin árini 2002-2004 er tó munandi størri enn hetta, og var meiri enn 93 mill. kr. Minkingin er serliga innan fiskivinnuna á sjógvi, men eisini í vinnuni á landi – sí talvu 11 omanfyri. Minkingin hesi árini er bæði í norðaru og sunnaru helvt av oynni – og hóast tølini eru væl størri í norðaru helvt, so er tó lutfalsliga minkingin í sunnaru helvt eins stór og í norðaru helvt.

Minkingin í bruttovinningi innan fiskivinnuna á Tvøroyri[20] er heilar 75,8 mill. kr. frá 2002 til 2004 – frá 133,8 mill. kr. í 2002 til 58,0 mill. kr. í 2004, svarandi til eina minking upp á umleið 57%. Frá 2004 til 2005 veksur bruttovinningurin hinvegin aftur við 18,3 mill. kr., og var bruttovinningurin innan fiskivinnuna á Tvøroyri 76,3 mill. kr. í 2005. Hóast vøkstur frá 2004 til 2005 so var minkingin í bruttovinninginum á Tvøroyri í tíðarskeiðinum frá 2002 til 2005 heili 57,5 mill. kr.

Bruttovinningurin hjá fiskivinnuni í sunnaru helvt minkaði við umleið 23 mill. frá 2002 til 2004. Fiskivinnan í Vági stendur fyri stóra partinum av minkingini. Bruttovinningurin hjá fiskivinnuni í Vági minkaði við 14,4 mill. kr. frá 2002 (39,0 mill. kr.) til 2004 (24,6 mill. kr.), men vaks aftur í 2005, tá bruttovinningurin var 33,6 mill. kr.

Í Hvalba er hinvegin ein vøkstur í bruttovinninginum í tíðarskeiðinum frá 2002 til 2005. Bruttovinningurin hjá fiskivinnuni veksur við 12,5 mill. kr., frá 26,8 mill. kr. í 2002 til 39,3 mill. kr. í 2005. Eisini her vísur tað seg, at fiskivinnan í Hvalba hevur eina meiri javna og positiva gongd í mun til fiskivinnuna í hinum báðum størru plássunum í oynni, Tvøroyri og Vág.

[20] t.v.s. í Tvøroyrar Kommunu.

### 4.3.2. Handils- og tænastuvinnan

| | 2002 | 2003 | 2004 | 2005 |
|---|---|---|---|---|
| Handils- og tænastuvinnan í sunnaru helvt | 14.179.000 | 13.871.000 | 14.274.000 | 14.011.000 |
| Handils- og tænastuvinnan í norðaru helvt | 28.800.000 | 27.282.000 | 28.072.000 | 24.370.000 |
| **Handils- og tænastuvinnan í Suðuroy tilsamans** | **42.979.000** | **41.153.000** | **42.346.000** | **38.381.000** |

**Talva 13. Bruttovinningurin hjá handils- og tænastuvinnuni í Suðuroy í árunum 2002-2005.**
*Keldur: Business Line og egnar kanningar.*

Bruttovinningurin hjá handils- og tænastuvinnuni í Suðuroynni liggur í tíðarskeiðinum frá 2002 til 2005 javnt um 40 mill. kr, +/- 2-3 mill. kr.. Hetta er helst ein staðfesting av, at marknaðurin hjá handils- og tænstuvinnuni er avmarkaður – og kanska minkandi, við tað at úrslitið í 2005 er tað lægsta í tíðarskeiðinum.

### 4.3.3. Ídnaðar- og handverksvinnan.

| | 2002 | 2003 | 2004 | 2005 |
|---|---|---|---|---|
| Ídnaðar- og handverksvinnan í sunnaru helvt | 19.785.000 | 24.305.000 | 18.532.000 | 29.324.000 |
| Ídnaðar- og handverksvinnan í norðaru helvt | 28.237.000 | 29.975.000 | 30.647.000 | 30.812.000 |
| **Ídnaðar- og handverksvinnan í Suðuroy tilsamans** | **48.022.000** | **54.280.000** | **49.179.000** | **60.136.000** |

**Talva 14. Bruttovinningurin hjá ídnaðar- og handverksvinnuni í Suðuroy í árunum 2002-2005.**
*Keldur: Business Line og egnar kanningar.*

Bruttovinningurin hjá ídnaðar- og handverksvinnuni veksur úr 48,0 mill. kr. upp í 60,1 mill. kr. í árunum frá 2002 til 2005. Ein av orsøkunum til vøksturin er, at vinnan í størri og størri mun luttekur í økta virkseminum innan byggivinnuna, ikki bara í Suðuroynni, men eisini í Føroyum og uttanlands. Serliga veksur bruttovinningurin hjá vinnuni í sunnaru helvt munandi, og var bruttovinningurin í 2005 áleið eins stórur í sunnaru og norðaru helvt av oynni.

## 4.4. Skuld og eginogn

Lutfallið millum *skuld* og *eginogn* sigur nakað um, hvussu sterk ein vinna er fíggjarliga, eitt nú í hvønn mun vinnan er før fyri standa ímóti sveiggjum ella at gera nýíløgur. Við at hyggja eftir broytingini yvir eitt áramál so fæst eisini ein mynd av, hvussu gongdin hevur verið.

### *4.4.1. Skuld*

Skuldin hjá parta- og smápartafeløgum í Suðuroynni er vaksin við 58,5 mill. kr. – úr 274,7 mill. kr. upp í 333,1 mill. kr. – í tíðarskeiðinum frá 2002 til 2005. Økingin í skuldini er umleið tann sama í norðaru og sunnaru helvt av oynni, um 29-30 mill. kr. í báðum økjunum.

| | 2002 | 2003 | 2004 | 2005 |
|---|---|---|---|---|
| Vinnan í sunnaru helvt | 105.931.000 | 122.212.000 | 105.539.000 | 135.887.000 |
| Vinnan í norðaru helvt | 168.732.000 | 186.799.000 | 190.837.000 | 197.262.000 |
| **Vinnan í Suðuroy tilsamans** | **274.663.000** | **309.011.000** | **296.376.000** | **333.149.000** |

**Talva 15. Skuld hjá vinnuni í Suðuroy í árunum 2002-2005.**
*Keldur: Business Line og egnar kanningar.*

**Fiskivinnan**

Økingin í skuldini er størst (og mest sum øll) innan fiskivinnuna, har skuldin økist við umleið 55,8 mill. kr. árini 2002 til 2005. Økingin í skuldini innan fiskivinnuna stavar einamest frá nýíløgum.

| | 2002 | 2003 | 2004 | 2005 |
|---|---|---|---|---|
| Fiskivinnan í sunnaru helvt | 60.142.000 | 69.718.000 | 68.687.000 | 94.467.000 |
| Fiskivinnan í norðaru helvt | 114.179.000 | 125.568.000 | 128.216.000 | 135.631.000 |
| **Fiskivinnan í Suðuroy tilsamans** | **174.321.000** | **195.286.000** | **196.903.000** | **230.098.000** |

**Talva 16. Skuld hjá fiskivinnuni í Suðuroy í árunum 2002-2005.**
*Keldur: Business Line og egnar kanningar.*

Skuldin innan fiskivinnuna í Hvalba er í árunum 2002 til 2005 vaksin við 11,4 mill. kr. m.a. orsakað av, at tað í tíðarskeiðinum eru gjørdar íløgur í djúpvatnstrolaran

Sjagaklettur og í flakavirkið í Hvalba. Á Tvøroyri er skuldin vaksin við 12,0 mill. kr.,millum annað orsaka av nýíløgum í landingarmiðstøð og línubátin Kúrberg, umframt at aðrar útbyggingar og dagføringar eru gjørdar bæði á sjógvi og landi. Í Vági er skuldin vaksin við 38,7 mill. kr. Millum orsøkirnar eru, at djúpvatnstrolarin Sancy, verksmiðjutrolarin Ran, partrolarin Nesborg og deksbáturin Comrade eru komnir til Vágs í nevnda tíðarskeiði.

Umframt at skuldin serliga er innan fiskivinnuna, so kann staðfestast, at tað serliga er innan fiskiskap, at skuldin økist í árunum 2002 til 2005, sí eisini talvu 17 niðanfyri.

| | 2002 | 2003 | 2004 | 2005 |
|---|---|---|---|---|
| Fiskiskapur | 123.313.000 | 142.989.000 | 151.153.000 | 176.018.000 |
| Fiskavøruídnaður | 51.008.000 | 52.297.000 | 45.750.000 | 54.080.000 |
| **Fiskivinnan tilsamans** | **174.321.000** | **195.286.000** | **196.903.000** | **230.098.000** |

**Talva 17. Skuld hjá fiskivinnuni í Suðuroy, býtt á fiskiskap og fiskavøruídnað, í árunum 2002-2005.**
*Keldur: Business Line og egnar kanningar.*

## Handils- og tænastuvinnan

Innan handils- og tænastuvinnuna er samlaða skuldin vaksin við góðum 10 mill. kr., frá 49,2 mill. kr. í 2002 til 59,4 mill. kr. í 2005. Vøksturin er serliga í sunnaru helvt av oynni, og stavar m.a. frá, at nýggjar fyritøkur verða stovnaðar, umframt at nýíløgur og dagføringar eru gjørdar innan vinnuna.

| | 2002 | 2003 | 2004 | 2005 |
|---|---|---|---|---|
| Handils- og tænastuvinnan í sunnaru helvt | 14.812.000 | 18.443.000 | 22.334.000 | 21.774.000 |
| Handils- og tænastuvinnan í norðaru helvt | 34.379.000 | 37.604.000 | 37.716.000 | 37.658.000 |
| **Handils- og tænastuvinnan í Suðuroy tilsamans** | **49.191.000** | **56.047.000** | **60.050.000** | **59.432.000** |

**Talva 18. Skuld hjá handils- og tænastuvinnuni í Suðuroy í árunum 2002-2005.**
*Keldur: Business Line og egnar kanningar.*

**Ídnaðar- og handverksvinnan**

Meðan skuldin innan handilsvinnuna veksur, so minkar skuldin innan ídnaðar- og handverksvinnuna við næstan 8 mill. kr. frá 2002 til 2005. Høvuðsorsøkin er, at Injector International í Vági fór á húsagang í 2003 og verður skuldin upp á umleið 20 mill. kr. "strikað". Skuldin í sunnaru helvt vaks tó við 5 mill. kr. frá 2004 til 2005. Skuldin í norðaru helvt vaks við knappliga 4 mill. kr. frá 2002 til 2005. Orsøkirnar til vøksturin er ein tilgongd av nýggjum fyritøkum og størri virksemi innan vinnuna sum heild, sum førir við sær øktan fíggjartørv.

| | 2002 | 2003 | 2004 | 2005 |
|---|---|---|---|---|
| Ídnaðar- og handverksvinnan í sunnaru helvt | 30.977.000 | 34.051.000 | 14.518.000 | 19.646.000 |
| Ídnaðar- og handverksvinnan í norðaru helvt | 20.174.000 | 23.627.000 | 24.905.000 | 23.973.000 |
| **Ídnaðar- og handverksvinnan í Suðuroy tilsamans** | **51.151.000** | **57.678.000** | **39.423.000** | **43.619.000** |

**Talva 19. Skuld hjá ídnaðar- og handverksvinnuni í Suðuroy í árunum 2002-2005.**
*Keldur: Business Line og egnar kanningar.*

## *4.4.2. Eginogn*

Samlaða eginognin hjá vinnuni í Suðuroynni er vaksin við 12 mill. kr. frá 2002 til 2005, frá 221,5 mill. kr. til 233,6 mill. kr. Tað er bara í norðaru helvt av oynni, at eginognin er vaksin; vøksturin er umleið 15 mill. kr., so at eginognin við árslok 2005 var 185,1 mill. kr. Í sunnaru helvt av oynni er samlaða eginognin tó minka við 3 mill. kr. niður í 48,4 mill. kr. Hetta staðfestir, at bert 21% av samlaðu eginognini hjá vinnuni er at finna hjá feløgum í sunnaru helvt av oynni (til samanberingar kann nevnast, at 45% av fólkinum í Suðuroynni býr í sunnaru helvt av oynni).

| | 2002 | 2003 | 2004 | 2005 |
|---|---|---|---|---|
| Vinnan í sunnaru helvt | 51.094.000 | 47.163.000 | 44.981.000 | 48.444.000 |
| Vinnan í norðaru helvt | 170.377.000 | 187.117.000 | 170.124.000 | 185.148.000 |
| **Vinnan í Suðuroy tilsamans** | **221.471.000** | **234.280.000** | **215.105.000** | **233.592.000** |

**Talva 20. Eginogn hjá vinnuni í Suðuroy í árunum 2002-2005.**
*Keldur: Business Line og egnar kanningar.*

**Fiskivinnan**

Innan fiskivinnuna er ein samlað minking í eginognini upp á 15 mill. kr. í árunum frá 2002 til 2005 – sí talvu 21. niðanfyri. Eginognin í norðaru helvt er vaksin, meðan hon er minkað í sunnaru helvt av oynni. Vøksturin í norðaru helvt er upp á uml. 4 mill. kr., meðan eginognin í sunnaru helvt er minkað við uml. 19 mill. kr. Í 2005 er eginognin í sunnaru helvt av oynni heilt lítil, og er hetta ein álvarsom støða fyri vinnuna, sum bæði er sera veik og hartil hevur at kalla ongar møguleikar fyri at menna seg.

| | 2002 | 2003 | 2004 | 2005 |
|---|---|---|---|---|
| Fiskivinnan í sunnaru helvt | 22.320.000 | 12.828.000 | 7.295.000 | 3.061.000 |
| Fiskivinnan í norðaru helvt | 96.712.000 | 110.814.000 | 90.008.000 | 100.876.000 |
| **Fiskivinnan í Suðuroy tilsamans** | **119.032.000** | **123.642.000** | **97.303.000** | **103.937.000** |

**Talva 21. Eginogn hjá fiskivinnuni í Suðuroy í árunum 2002-2005.**
*Keldur: Business Line og egnar kanningar.*

Um skilt verður millum fiskiskap og fiskavøruídnað (fiskivinnuna á landi), so er myndin greið: tað er serliga innan fiskavøruídnað, at eginognin minkar, meðan eginognin innan fiskiskap í 2005 var á leið hin sama sum í 2002. Orsøkin til minkingina í eginognini innan fiskavøruídnað er, at fiskivinnan á landi í Vági í 2003 og í 2004 hevði vánalig úrslit, og ávirkaðu hesi eisini eginognina.

| | 2002 | 2003 | 2004 | 2005 |
|---|---|---|---|---|
| Fiskiskapur | 88.013.000 | 97.761.000 | 81.419.000 | 85.382.000 |
| Fiskavøruídnaður | 31.019.000 | 25.881.000 | 15.884.000 | 18.555.000 |
| **Fiskivinnan í Suðuroy tilsamans** | **119.032.000** | **123.642.000** | **97.303.000** | **103.937.000** |

**Talva 22. Eginogn hjá fiskivinnuni í Suðuroy, býtt í fiskiskap og fiskavøruídnað, í árunum 2002-2005.**
*Keldur: Business Line og egnar kanningar.*

**Handils- og tænastuvinnuna**

Innan handils- og tænastuvirksemi er eginognin vaksin við 14 mill. kr., frá uml. 78,9 mill. kr. í 2002 til 92,8 mill. kr. í 2005 – sí eisini talvu 23 niðanfyri. Í sunnaru helvt er vøksturin góðar 11 mill. kr., men her stavar ein partur av vøkstrinum frá uppskriving av virðum á ognum. Vøksturin í norðaru helvt er í tíðarskeiðinum góðar 2 mill. kr.

| | 2002 | 2003 | 2004 | 2005 |
|---|---|---|---|---|
| Handils- og tænastuvinnan í sunnaru helvt | 17.258.000 | 24.567.000 | 25.293.000 | 28.856.000 |
| Handils- og tænastuvinnan í norðaru helvt | 61.663.000 | 61.175.000 | 63.362.000 | 63.956.000 |
| **Handils- og tænastuvinnan í Suðuroy tilsamans** | **78.921.000** | **85.742.000** | **88.655.000** | **92.812.000** |

**Talva 23. Eginogn hjá handils- og tænastuvinnuni í Suðuroy í árunum 2002-2005.**
*Keldur: Business Line og egnar kanningar.*

**Ídnaðar- og handverksvinnan**

Innan ídnaðar- og handverksvinnuna er vøksturin góðar 13 mill. kr. Í norðaru helvt er vøksturin 8,3 mill. kr., meðan vøksturin í sunnaru helvt er 5 mill. kr.

| | 2002 | 2003 | 2004 | 2005 |
|---|---|---|---|---|
| Ídnaðar- og handverksvinnan í sunnaru helvt | 11.516.000 | 9.768.000 | 12.393.000 | 16.527.000 |
| Ídnaðar- og handverksvinnan í norðaru helvt | 12.002.000 | 15.128.000 | 16.754.000 | 20.316.000 |
| **Ídnaðar- og handverksvinnan í Suðuroy tilsamans** | **23.518.000** | **24.896.000** | **29.147.000** | **36.843.000** |

**Talva 24. Eginogn hjá ídnaðar- og handverksvinnuni í Suðuroy í árunum 2002-2005.**
*Keldur: Business Line og egnar kanningar.*

### 4.4.3. Veik vinna í Vági – sterk vinna í Hvalba

Um hugt verður eftir teimum størru broytingunum, hvat viðvíkur skuld og eginogn, so er tað serliga í Vági, at stórar broytingar eru skeiva vegin. Eginognin innan fiskivinnuna í Vági er í árunum 2002 til 2005 minkað úr 21,4 mill. kr. niður í 2,7 mill. kr., meðan skuldin í sama tíðarskeiði er vaksin við 38,7 mill. kr. – úr 54,2 mill. kr. til 92,9 mill. kr. Við øðrum orðum var eginognin innan fiskivinnuna í Vági í 2005 bert 2,9% av skuldini. Hetta ger fiskivinnuna í Vági sera veika, og møguleikarnir fyri nýíløgum eru mest sum ongir í sjálvari vinnuni. Ein fyritreyt fyri nýíløgum er sostatt, at peningurin kemur uttanífrá. Í hesum sambandi kann leggjast afturat, at tað í 2006 eru farnar ávísar broytingar fram innan fiskivinnuna í Vági. Millum annað hava tvey nýstovnaði feløg keypt djúpvatnstrolararnir Roc Amadour og Sancy, umframt at partapeningurin í PF Tvøran, sum eigur partrolararnir Nesborg og Bliki, er øktur munandi í 2005 og 2006.

Innan fiskivinnuna í Suðuroy er tað fiskivinnan í Hvalba, ið "hevur tað best". Hóast skuldin í árunum 2002 til 2005 er vaksin við 11,4 mill. kr. orsaka av, at íløgur eru gjørdar í skip og virki, so er eginognin í sama tíðarskeiði vaksin við 22,1 mill. kr. Vøksturin stavar einamest frá, at vinnan megnar at skapa avlop av rakstri til øking av eginognini. Meðan eginognin innan fiskivinnuna í Hvalba var um 12,1 mill. kr. størri enn skuldin í 2002, so var eginognin um 22,8 mill. kr. størri enn skuldin í 2005. Henda gongdin gevur sera stórar møguleikar fyri nýíløgum, og fleiri hepnar íløgur eru eisini gjørdar í Hvalba í tíðarskeiðinum 2002 til 2005.

Við árslok 2005 var eginognin hjá fiskivinnuni í Hvalba 56,6 mill. kr.; til samanbering var eginognin hjá fiskivinnuni í Vági tá 2,7 mill. kr. Samlaða eginognin hjá fiskivinnuni í Suðuroy var við árslok í 2005 uml. 103,9 mill. kr., t.v.s. at meiri enn helvtin av samlaðu eginognini í fiskivinnuni í Suðuroynni við árslok í 2005 var at finna í Hvalba!

# 5. Lyklatøl fyri vinnuna í Suðuroy

Í undanfarnu pørtum eru uppsett úrslit áðrenn skatt, úrslit áðrenn rentur, skuld og eginogn fyri vinnuna í Suðuroynni. Hesi úrslit verða brúkt í smb. við útrokning av nøkrum lyklatølum, ið vanliga verða nýtt til at lýsa gongdina hjá einum virki ella hjá einari vinnu. Lyklatølini, sum talan er um, eru *ognaravkast*, *eginognaravkast* og *soliditetur*. Umframt at hesi lyklatøl lýsa gongdina og støðuna hjá virkjum ella vinnum, so skapa lyklatølini eisini grundarlag fyri eini samanbering, soleiðis at lyklatøl úr Suðuroy kunnu samanberast við lyklatøl úr øðrum pørtum av landinum ella støðuna í landinum sum heild – um hesi lyklatøl eru tøk.

**Ognaravkast**

Ognaravkast er lyklatal, ið setur rakstrarstøðuna upp ímóti fíggjarstøðuni. Úrslit áðrenn rentur, ið er tann parturin av rakstrinum sum er eftir til at gjalda kostnaðin / rentu av fremmandakapitali (t.d. rentu av lánum og kreditorskuld) og til broyting av eginognini, verður sett upp ímóti samlaða kapitalinum. Ognaravkastið vísir sostatt, í hvønn mun felagið megnar at forrenta tann samlaða kapitalin t.v.s. bæði fremmandakapital og eginkapital.

| | |
|---|---|
| **Ognaravkast**: | Úrslit áðrenn rentur x 100<br>Skuld + Eginogn |

**Eginognaravkast**

Eginognarsavkast er lyklatal, ið setur tann partin av rakstrinum, ið er eftir til at forrentað eginognina, upp ímóti sjálvari eginognini. Lyklatalið vísir, í hvønn mun felagið megnar at forrenta tað, ið eigarin hevur skotið inn í felagið.

| | |
|---|---|
| **Eginognaravkast**: | Úrslit eftir skatt x 100<br>Eginogn |

**Soliditetur**

Soliditeturin er lyklatal, ið setur eginognina upp ímóti samlaðu fíggjarstøðuni. Lyklatalið vísir, hvussu stór eginognin er lutfalsliga, umframt at lyklatalið eisini vísir evnini hjá felagnum at standa ímóti tapi.

| | |
|---|---|
| **Soliditetur**: | $\frac{\text{Eginogn x 100}}{\text{Skuld + Eginogn}}$ |

## 5.1. Lyklatøl fyri Suðuroy

Í hesum partinum eru lyklatøl roknaði fyri allar vinnur í oynni, umframt at lyklatøl eru roknað fyri sunnaru og norðaru helvt hvør sær. Somuleiðis eru lyklatøl eisini roknaði fyri hvønn vinnubólk sær.

| | 2002 | 2003 | 2004 | 2005 |
|---|---|---|---|---|
| Ognaravkast | 7,4% | 3,9% | 0,1% | 3,9% |
| Eginognaravkast | 7,2% | -0,9% | -6,9% | 5,1% |
| Soliditetur | 44,7% | 43,1% | 42,1% | 41,2% |

**Talva 25. Lyklatøl fyri Suðuroy árini 2002-2005.**

**Lágt ognaravkast**

Samlaða ognaravkastið hjá vinnuni í Suðuroynni minkaði munandi frá 2002 til 2004, og var næstan 0% í 2004. Ognaravkastið hækkaði tó aftur í 2005. Gongdin í sunnaru og norðaru helvt av oynni er nøkulunda eins, tó er ognaravkastið í sunnaru helvt á væl lægri støði enn í norðaru helvt. Bæði í 2003 og 2004 var ognaravkastið minni enn 1% í sunnaru helvt, og í norðaru helvt var ognaravkastið í 2004 komi heilt niður á 0,0%.

Tølini í talvunum omanfyri bera boð um, at samlaða vinnan í Suðuroy í ávísum árum als ikki megnar at forrenta skuldina. Serliga trupul er støðan í sunnaru helvt, har vinnan sæð undir einum ongantíð í tíðarskeiðinum frá 2002 til 2005 megnar at gjalda hvørjum sítt – meira um hetta niðanfyri.

**Eginognaravkast**

Eginognaravkastið minkaði eisini munandi í tíðarskeiðinum frá 2002 og var negativt í 2003 og 2004. Tó var eginognaravkastið aftur positivt í 2005. Fyri vinnuna í sunnaru helvt av Suðuroy var eginognaravkastið longu í 2002 um 0%, og øll árini til og við 2005 var eginognaravkastið negativt. Serliga í 2003 var fíggjarliga gongdin serliga ring, tá eginognaravkastið hjá vinnuni í sunnaru helvt var –20%. Í norðaru helvt var eginognaravkastið positivt í 2002 og 2003, men minkaði tó og gjørdist negativt í 2004 við -6,0%. Síðani varð eginognaravkastið aftur positivt í 2005, tá tað var 7,2%.

Eitt negativt eginognaravkast merkir, at vinnan ikki megnar at konsolidera seg, t.v.s. at eginognin minkar og vinnan gerst veikari og veikari. Harumframt ávirkar hetta eisini soliditetin negativa vegin.

**Soliditeturin**

Tann vánaliga gongdin í inntjeningini hjá vinnuni í Suðuroy ger eisini, at soliditeturin minkaði árini frá 2002 til 2005. Í norðaru helvt minkaði soliditeturin fram til 2004, men hækkaði tó aftur í 2005. Í norðaru helvt liggur samlaði soliditeturin á umleið 50% alt tíðarskeiðið, og var í 2005 48,4%. Í sunnaru helvt minkaði soliditeturin mest sum alt tíðarskeiðið, og var hann komin heilt niður á 26,3% í 2005. Hetta merkir so aftur, at vinnan hevur minni og minni rásarúm, tá ræður um fíggjarligu orku at standa ímóti tapum, og enn minni rásarúm, tá umræður at gera nýíløgur og á tann hátt menna seg.

## 5.2. Lyklatølini ymisk í norðaru- og sunnaru helvt av oynni

Um vit greina lyklatølini sundur í norðaru- og sunnaru helvt í oynni, so er myndin rættiliga greið: Tað er stórur munur á vinnulívinum í norðaru helvt og sunnaru helvt í oynni. Sí eisini talvur 26 og 27 niðanfyri.

| | 2002 | 2003 | 2004 | 2005 |
|---|---|---|---|---|
| Ognaravkast | 8,9% | 5,3% | 0,0% | 4,5% |
| Eginognaravkast | 9,4% | 4,0% | -6,0% | 7,2% |
| Soliditetur | 50,3% | 50,0% | 47,1% | 48,4% |

**Talva 26. Lyklatøl fyri Suðuroyar norðaru helvt árini 2002-2005.**

| | 2002 | 2003 | 2004 | 2005 |
|---|---|---|---|---|
| Ognaravkast | 4,2% | 0,9% | 0,5% | 2,5% |
| Eginognaravkast | -0,3% | -20,0% | -10,3% | -2,6% |
| Soliditetur | 32,5% | 27,8% | 29,8% | 26,3% |

**Talva 27. Lyklatøl fyri Suðuroyar sunnaru helvt árini 2002-2005.**

Tá hugt verður at ognaravkastinum, so er greitt, at ognaravkastið í sunnaru helvt ikki er nóg stórt til, at kapitalkostnaður av fremmandafígging kann rindast – hetta er galdandi hjá vinnuni (undir einum) í sunnaru helvt í øllum tíðarskeiðinum. Hetta er somuleiðis galdandi fyri vinnuna í norðaru helvt í 2004, umframt at lága ognaravkastið í 2003 og 2005 gevur ábendingar um, at partar av vinnuni ikki megna at rinda kapitalkostnaðin.

Eitt negativt eginognaravkast stuðlar eisini upp undir hesa niðurstøðu. Eginognaravkastið í sunnaru helvt var negativt øll árini 2002-2005, meðan tað var negativt í norðaru helvt í 2004 og positivt hini árini. Við øðrum orðum er eginognin hjá vinnuni í sunnaru helvt minkað støðugt árini 2002 til 2005. Hinvegin hevur tað positiva eginognaravkastið í norðaru helvt økt um eginognina.

Ein annar høvuðsmunur á vinnuni í norðaru og sunnaru helvt er, at soliditeturin er rættiliga ymiskur. Í norðaru helvt er soliditeturin millum 47% og 50% øll árini, meðan soliditeturin í sunnaru helvt er millum 26% og 32%. Tískil er tað stórur munur á, í hvønn mun vinnan í norðaru helvt og sunnaru helvt hava fíggjarliga orku at standa ímóti tapum ella at gera nýíløgur.

## 5.3. Lyklatøl fyri vinnubólkar

Niðanfyri eru uppsett lyklatøl fyri teir tríggjar vinnubólkarnar fiskivinnuna, handils- og tænastuvinnuna og ídnaðar- og handverksvinnuna. Á henda hátt fæst ein mynd av, hvussu hevur gingist hjá teimum ymisku vinnubólkunum í oynni tey seinastu árini.

**Niðurgongd í fiskivinnuni**

Síðani 2002 hevur verið ein jøvn niðurgongd í inntjeningsevninum í fiskivinnuni, og í 2004 var ognaravkastið negativt, t.v.s. at samlaða úrslitið hjá fiskivinnuni áðrenn rentur var eitt hall. Ognaravkastið varð tó aftur positivt í 2005 við 2,2%.

| | 2002 | 2003 | 2004 | 2005 |
|---|---|---|---|---|
| Ognaravkast | 8,4% | 3,4% | -3,6% | 2,2% |
| Eginognaravkast | 7,4% | -2,5% | -21,0% | 1,7% |
| Soliditetur | 40,6% | 38,8% | 33,1% | 31,1% |

**Talva 28. Lyklatøl fyri fiskivinnuna í Suðuroy árini 2002-2005.**

Niðurgongdin er eisini sjónlig í eginognaravkastinum, sum gjørdist negativt longu í 2003. Hetta merkir, at vinnan hevði hall eftir rentur og skatt. Í 2004 var fíggjarliga gongdin serliga ring, tá eginognaravkastið var –21%. Hetta ávirkar soliditetin munandi, og minkaði soliditeturin eisini við heili 5,7% frá 2003 til 2004.

Í 2005 vendi gongdin, og hetta árið eru bæði ognaravkast og eginognaravkast positiv. Tað vil siga, at vinnan hevði positiv tøl áðrenn rentur og eftir skatt; tó eru avkastini lítil, og lítla ognaravkastið ber boð um, at ikki øll vinnan í 2005 megnaði at gjalda allar renturnar.

Soliditetsgradurin fellur alt tíðarskeiði frá 2002 til 2005, hóast fiskivinnan hevði eitt samlað avlop eftir skatt í 2005. Orsøkin til hetta er ivaleyst, at íløgur eru gjørdar í vinnuni, soleiðis at skuldin er vaksin lutfalsliga meira enn eginognin.

Stórur munur er á lyklatølunum fyri fiskivinnuna í Hvalba – har fiskivinnan í oynni hevur tað best í 2005 – og í Vági, har fiskivinnan í oynni hevði tað ringast í 2005.

Fiskivinnan í Hvalba hevði í 2005 eitt ognaravkast upp á 8,6%, eitt eginognaravkast upp á 20,0%, og soliditeturin var 62,6%. Í 2005 hevði fiskivinnan í Vági eitt ognaravkast upp á –2,8%, eitt eginognaravkast upp á –221,4% (lágur eginpeningur og stór hall føra við sær stórt negativt eginognaravkast), og soliditeturin var 2,8%.

**Handils- og tænastuvinnan minkandi inntjening**

Lyklatølini fyri handils- og tænastuvinnuna staðfesta, at vinnan hevur eina minkandi inntjening í árunum 2002 til 2005.

| | 2002 | 2003 | 2004 | 2005 |
|---|---|---|---|---|
| Ognaravkast | 5,8% | 4,5% | 4,4% | 3,6% |
| Eginognaravkast | 7,3% | 2,2% | 3,8% | 2,6% |
| Soliditetur | 61,8% | 60,5% | 59,6% | 61,0% |

**Talva 29. Lyklatøl fyri handils- og tænastuvinnuna í Suðuroy árini 2002-2005.**

Bæði ognar- og eginognaravkast minka frá 2002 til 2005. Lítla eginognaravkastið frá 2003 til 2005 ger, at vinnan ikki megnar at konsolidera seg stórvegis. Minni lántøkur í vinnuni gera, at soliditetsgradurin ikki veksur hóast positivt eginognaravkast. Annars er soliditeturin á rímiliga høgum støði, og hevur vinnan sostatt nakað at standa ímóti við. Hinvegin vil ein avmarkaður og møguliga minkandi marknaður gera, at vakstrarpotentialið í hesari vinnu er avmarkað. Hetta seinasta kann helst eisini staðfestast við, at fleiri handilsfyritøkur tey seinastu árini hava riggað av ella lagt saman við øðrum.

**Vakstrarpotentialið í ídnaðar- og handverksvinnuni**

Síðani 2003 hevur ídnaðar- og handverksvinnan í Suðuroynni havt eina skjótt veksandi inntjening. Hetta verður eisini staðfest við vaksandi ognar- og eginognaravkasti.

| | 2002 | 2003 | 2004 | 2005 |
|---|---|---|---|---|
| Ognaravkast | 6,5% | 4,7% | 6,7% | 11,1% |
| Eginognaravkast | 5,9% | -3,1% | 7,6% | 21,4% |
| Soliditetur | 31,5% | 30,1% | 42,4% | 45,8% |

**Talva 30. Lyklatøl fyri ídnaðar- og handverksvinnuna í Suðuroy árini 2002-2005.**

Ognar- og eginognaravkastið minkar tó frá 2002 til 2003, tá eginognaravkastið eisini er negativt. Tað vil siga, at samlaða úrslitið eftir skatt er negativt. Henda gongdin ávirkar eisini soliditetsgradin, ið minkar í sama tíðarskeiði. Frá 2004 vendist gongdin fullkomiliga. Og í 2005 hevur vinnan eitt eginognaravkast upp á heili 21,4%. Positiva gongdin í inntjening ávirkar eisini soliditetin, ið veksur munandi í tíðarskeiðinum. Og frá at vera heldur vánaliga konsoliderað í 2002 og 2003 má vinnan metast at vera rímiliga væl konsoliderað í 2005. Skjótt veksandi soliditetsgradurin bendir á, at vinnan hevur eisini megnað at víðka um virksemi uttan stórvegis íløgur og lántøku.

# 6. Óstøðug gongd við minkandi inntjening

Í hesum arbeiðsritinum er fokus sett á vinnuligu gongdina í Suðuroynni. Myndin er sum so rættiliga greið. Í fyrsta lagi eru tað í Suðuroynni lutfalsliga fá parta- og smápartafeløg, um samanborið verður við miðal fyri alt landið. Orsøkirnar til hetta eru uttan iva fleiri. Eitt er, at grundarlagið fyri at stovna nýggjar fyritøkur í Suðuroynni í nógvum førum er veikt. Eitt annað er, at marknaðurin innan summar vinnur er sera avmarkaður, ikki minst í teimum førum, tá fyritøkur bert kunnu bjóða seg fram í Suðuroynni. Hartil eru tað eisini innan ávísar vinnur strong krøv til fíggjarligt grundarlag fyri yvirhøvur at koma í gongd. Eitt veikt fíggjarliga grundarlag, við avmarkaðari atgongd til váðafúsan kapital og (tískil eisini í flestu førum til) lánikapital, hevur merkt Suðuroynna í fleiri ár, og eru tað eisini nógv dømi um ætlaðar fyritøkur, sum av hesi orsøk ikki eru komnar í gongd. Í nógvum førum eru ábendingar um, at sjálv geografiska plaseringin í Suðuroynni er ein partur av trupulleikanum.

Í øðrum lagi hevur gongdin hjá vinnulívinum í Suðuroynni seinastu árini (sæð undir einum) verið óstøðug við minkandi inntjening. Partar av vinnuni hava tó havt eina javna, góða gongd. Hetta hevur m.a. verið galdandi fyri fiskivinnuna í Hvalba, umframt at ídnaðar- og handverksvinnan (kanska serliga í Vági) tey seinastu árini hevur havt góð ár. Hinvegin hevur fiskivinnan í sunnaru helvt av oynni havt eina vánaliga gongd í fleiri ár og var við árslok 2005 sera veik, við óvanliga lítlari eginogn (ikki minst um hugsað verður um rakstrargøgnini, sum vinnan fevnir um). Gongdin innan handils- og tænastuvinnuna hevur verið nøkulunda støðug, tó talan hevur verið um minkandi inntjening. Sum er, er handils- og tænastuvinnan tó hampiliga væl konsolideráð.

Ein óstøðug vinnulig gongd hevur sjálvsagt ávirkan á, hvussu nógv virksemi – hvussu nógv arbeiði – er í Suðuroynni. Hetta ávirkar eisini áhugan hjá fólki at verða verandi í oynni ella at flyta aftur til oynna. Ein av avbjóðingunum er tí at skapa eina meiri støðuga gongd. Í hesum sambandi er spurningurin, hvussu ein meiri støðug, góð gongd kann skapast í Suðuroynni, og somuleiðis eisini hvørjir eru vakstrarmøguleikarnir hjá vinnuni í oynni, bæði hjá verandi vinnum og hjá møguligum nýggjum vinnum?

# 7. Vakstrarvinnur og vakstrarmøguleikar

Sæð yvir eitt longri tíðarskeið – tey seinastu 150-200 árini – so hava tað í skiftandi tíðarskeiðum verið ymiskar vakstrarvinnur í Føroyum. Avbjóðingin hjá fólki og vinnu í teimum ymisku pørtunum av landinum hava verið at fáa lut í hesum vøkstri – at megna at skapa vinnur innan vinnugreinir, sum eru í vøkstri.

Í byrjanin av 1900 talinum megnaði fólk og vinna í Suðuroynni at draga fyrimun av nøkrum natúrliga givnum fyrimunum – góðum firðum og stutt farleið á góð fiskimið – og skapa eina sterka fiskivinnu. – Á tann hátt gjørdist Suðuroy vinnuliga dynamoin í Føroyum. Nógv fólk fluttu til Suðuroyar at arbeiða, og fleiri teirra settu búgv í oynni, og fólkatalið vaks nógv. Í 1921 búðu út við 23% av øllum føroyingum í Suðuroynni (Landsfólkayvirlitið). Men sum samfelagið mentist og tíðirnar broyttist í árunum áðrenn og eftir Seinna Heimsbardaga, so broytist eisini týdningurin av fyrimununum, sum Suðuroy hevði fyrst í 1900talinum. Hetta broyttu eisini støðuna í Suðuroy – og sum árini gingu, so gjørdist onnur øki í landinum vakstrarøki. Og á hendan hátt hava ymisk øki í landinum verið vakstrarøki í ymiskum tíðarskeiðum

Fólkatalið í Suðuroynni vaks til miðskeiðis í 1950unum, tá fleiri enn 6.300 fólk búðu í oynni. Eftir hetta minkaði fólkatalið líðandi fram til miðskeiðis í 1970árunum. Fólkatalið vaks tó nakað aftur miðskeiðis í 1970árunum og var støðugt fram til endan av 1980árunum, einamest orsakað av vinnuligum vøkstri, serliga innan flakavinnuna og innan fiskiskap. Síðan byrjanina av 1990árunum er fólkatalið tó støðugt minkað, og árinini av búskaparkreppuni fyrst í 1990árunum eru serliga sjónlig í gongdini í fólkatalinum í Suðuroynni. Við ársbyrjan 2007 var fólkatalið í Suðuroynni umleið tað sama sum í fyrru helvt av 1920árunum – og búðu tá umleið 10% av føroyingunum í Suðuroynni (Hagstova Føroya).

Orsøkirnar til skeivu gongdina tey seinastu ártíggjuni eru fleiri. Ein óstøðug gongd innan privata vinnulívið í Suðuroynni hevur sjálvsagt ávirkan á gongdina í fólkatalinum. Ein onnur orsøk er eisini, at tað í Suðuroynni ikki er so nógv virksemi innan tær vinnur, sum í dag eru vakstrarvinnur í Føroyum. Men hvørjar eru vakstrarvinnurnar í Føroyum í dag, og hvussu er støðan í Suðuroynni sammett við restina av landinum?

## 7.1. Vakstrarvinnur og Suðuroy

Um lønarútgjaldingar í Føroyum tey seinastu 20 árini verða brúktar sum útgangsstøðið, so fáa vit eina greiða mynd av, hvørjar vinnur hava verið í vøkstri seinastu ártíggjuni.

Í tíðarskeiðinum frá 1985 til 2005 eru lønarútgjaldingarnar í Føroyum vaksnar 104%, frá okkurt um 3 milliardum kr. í 1985 til 6 milliardir kr. í 2005 (sí eisini talvu 31 niðanfyri). Um hugt verður at gongdini í lønarútgjaldingum býtt á vinnubólkar – 1) *Framleiðsluvinnur*, 2) *Bygging, handil v.m.* og 3) *Almenn fyrisiting v.m.* – so er tað serliga ein vinnubólkur, sum hevur verið í stórum vøkstri síðan 1985, og tað er bólkurin *Almenn fyrisiting v.m.*.

| Føroyar | 1985 | 1995 | 2005 | %-vísi vøkstur 1985-2005 | %-býti á vinnubólkar í 2005 |
|---|---|---|---|---|---|
| Framleiðsluvinnur | 1.115.386 | 895.363 | 1.658.427 | 49% | 27,6% |
| Bygging, handil v.m. | 1.052.118 | 1.002.793 | 2.126.153 | 102% | 35,4% |
| Almenn fyrisiting v.m. | 776.991 | 1.147.296 | 2.220.257 | 186% | 37,0% |
| Tilsamans | 2.944.495 | 3.045.452 | 6.004.837 | 104% | 100,0% |

**Talva 31. Lønarútgjaldingar (í 1.000 kr.) í Føroyum, árini 1985, 1995 og 2005, býtt á vinnubólkar.**
*Kelda: Hagstova Føroya*

Vøksturin innan vinnubólkin *Almenn fyrisiting v.m.* er 186% í tíðarskeiðinum frá 1985 til 2005. Innan *Bygging, handil v.m.* er eisini talan um ein munandi vøkstur, sum er upp á 102% - sum tó er minni enn samlaði vøksturin í lønarútgjaldingunum. Vøksturin innan *Framleiðsluvinnurnar* er hinvegin lutfalsliga lítil, bert 49% - leggjast kann afturat, at í sama tíðarskeiði er arbeiðsmannalønin hækkað við umleið 65% (Føroya Arbeiðarafelag). Hetta gevur eina greiða ábending um, hvørjar vinnur eru í vøkstri og hava verið tað tey seinastu ártíggjuni.

Eisini tá hugt verður at %-býtinum býtt á vinnubólkar er greitt, hvørjar vinnur eru vaksnar tey seinastu árini. Í 1985 taldi bólkurin *Almenn fyrisiting v.m.* 26,4% av samlaðu lønarútgjaldingunum í landinum – í 2005 var hetta talið 37,0%. Í 1985 vórðu 35,7% av samlaðu lønunum rindaðar innan bólkin *Bygging, handil v.m.* – í 2005 var

talið á leið tað sama, 35,4%. Innan *Framleiðsluvinnurnar* er ein stór minking frá 1985 til 2005 – í 1985 vórðu 37,9% av samlaðu lønarútgjaldingunum útgoldnar innan *Framleiðsluvinnurnar*, í 2005 var hetta talið 26,7%.

### *7.1.1. Lítil vøkstur í Suðuroynni*

Umframt at vøksturin innan ávísu vinnubólkarnir hevur verið ymiskur frá einum bólki til annan, so hevur tað eisini verið rættiliga ymiskt í hvørjum økjum í landinum, vøkstur hevur verið.

Í hesum arbeiðsritinum er fokus á Suðuroynna, tí verður í hesum umfari einamest sett fokus á, hvussu gongdin í Suðuroynni hevur verið samanborið við í landinum sum heild. Tølini fyri alt landið og fyri allar sýslurnar í landinum eru tó í Fylgiskjali 1 (aftast í arbeiðsritinum) og ber har til at gera egnar samanberingar.

| Suðuroyar sýsla | 1985 | 1995 | 2005 | %-vísi vøkstur 1985-2005 | %-býti á vinnubólkar í 2005 |
|---|---|---|---|---|---|
| Framleiðsluvinnur | 132.570 | 106.855 | 191.999 | 45% | 38,9% |
| Bygging, handil v.m. | 91.119 | 69.818 | 136.840 | 50% | 27,8% |
| Almenn fyrisiting v.m. | 67.384 | 89.588 | 164.147 | 144% | 33,3% |
| Tilsamans | 291.073 | 266.261 | 492.986 | 69% | 100,0% |

**Talva 32. Lønarútgjaldingar (í 1.000 kr.) í vinnubólkum í Suðuroyar sýslu, árini 1985, 1995 og 2005.**
*Kelda: Hagstova Føroya.*

Í talvu 32 omanfyri eru lønarútgjaldingarnar í Suðuroyar Sýslu í árunum 1985, 1995 og 2005 býttar á vinnubólkar. Um samanborið verður við gongdina í Føroyum sum heild (sí talvu 31), so er greitt, at lutfalsligi vøksturin í lønarútgjaldingum hevur verið nógv lægri í Suðuroynni enn í Føroyum sum heild – 69% í Suðuroynni mótvegis 104% í Føroyum.

Eisini er vert at leggja til merkis, at innan *Almenna fyrisiting v.m.*, sum er tann vinnubólkurin, ið er vaksin mest í Føroyum árini 1985 til 2005, er vøksturin í Suðuroynni eisini lágur, eisini tá sammett verður við onnur økið í landinum. Størsti

vøkstur í lønarútgjaldingum innan *Almenna fyrisiting v.m.* hevur verið í Eysturoyar Sýslu, har lønarútgjaldingarnar eru vaksnar við 306% í nevnda tíðarskeiði, í Sandoyar Sýslu er vøksturin 280%, í Vága Sýslu 258%, í Streymoyar Sýslu 169% og í Norðoya Sýslu 159%.

Umframt *Almenna fyrisiting v.m.*, so hevur sum nevnt eisini verið ein ávísur vøkstur innan vinnubólkin *Bygging, handil v.m.* Innan hendan bólk hevur vøksturin í Suðuroynni tó ikki verið eins stórur og í landinum sum heild. – Og tá samanborið verður við tey ymisku økini í landinum, er myndin hin sama sum við *Almennari fyrisiting v.m.*: Vøksturin í lønarútgjaldingum innan *Bygging, handil v.m.* er lægstur í Suðuroynni.

Um hugt verður at *Framleiðsluvinnunum*, so er gongdin hin sama. Vøksturin í lønarútgjaldingum í Suðuroynni hevur ikki verið eins stórur og í landinum sum heild. Treyðugt so er vøksturin í lønarútgjaldingum í Suðuroynni størri enn í ávísum pørtum av landinum, t.d. í Sandoyar Sýslu og í Vága Sýslu, har talan hevur verið um eina minking í lønarútgjaldingunum upp á –3% og –2%. Áhugavert er eisini, at størsti vøksturin hevur verið í Streymoyar Sýslu, har vøksturin var 70%.

Stutt sagt, so er tað m.a. ein trupulleiki í Suðuroynni, at:

I) vøksturin í oynni sum heild hevur verið lágur, tá samanborið verður við restina av landinum.

II) vøksturin innan vakstrarvinnurnar (*Almenn fyrisiting v.m.* og partvíst *Bygging, handil v.m.*) hevur verið lágur, tá samanborið verður við restina av landinum.

III) vøksturin innan framleiðsluvinnuna (sum er tann størsta í oynni) er lægri enn í landinum sum heild.

Nevndu viðurskifti hava heilt greitt havt ávirkan á skeivu gongdina í Suðuroynni – og í so máta kann staðfestast, hvør trupulleikin er. Avbjóðingin er at taka upp trupulleikan og arbeiða við at venda gongdini.

## 7.2. Ein avbjóðing at velja, og velja rætt

Fyri at venda skeivu gongdini í Suðuroynni er neyðugt, at arbeitt verður við at venda gongdini, tí onki hendir av sær sjálvum. Neyðugt er at velja, hvør leiðin er at ganga – og ikki minst, so er tað neyðugt, at hetta val er rætt (ella so rætt sum gjørligt). Og í hesum sambandi eru tað nógv ymisk viðurskifti, sum kunnu, mugu og skulu dragast inn í viðgerðina, áðrenn valt verður. Millum annað eigur at verða hugt eftir, hvørjir vakstrarmøguleikar eru í verandi vinnum í Suðuroy. Hvørjar tillagingar kunnu gerast fyri, at hesar vinnur eru við til at skapa størri vøkstur. Hvussu kunnu fleiri fyritøkur/stovnar mennast innan tær vakstrarvinnur, sum eru í landinum í dag? Hvussu skapa vit virksemi innan vinnur, sum fólk halda vera spennandi at arbeiða í? Hetta eru bara nøkur fá av nógvum viðurskiftum, sum eiga at verða tikin upp og viðgjørd. Hetta arbeiðsritið kann brúkast sum eitt íkast í hesari viðgerð, men tað er tó neyðugt, at nógv størri fokus enn higartil verður sett á at gera eina miðvísa menningarætlan fyri Suðuroynna.

Suðuroyggin er sum so í einari serligari støðu, um samanborið verður við aðrar partar av landinum. Við undirsjóvartunlum vestur í Vágar og til Klaksvíkar kunnu umleið 85% av føroyingunum koyra í túnið hjá hvørjum øðrum – ella bjóða seg fram á arbeiðsmarknaðinum í stórum pørtum av landinum og innan nógv ymisk virkisøkir. Hóast sambandið um Suðuroyarfjørð er dagført við nýggjum ferðamannaskipið, so hava suðringar ikki líka góðar møguleikar sum nógvir aðrir føroyingar at fáa lut í vøkstrinum í miðstaðarøkinum. Tí er eisini neyðugt at seta fokus á menningina av Suðuroynni, við Suðuroynni sum útgangsstøði. Og í so máta er tað positivt, at kommunurnar í Suðuroynni (í tøttum samstarvi við fakligan serkunnleika) saman við landsmyndug-leikunum hava sett hol á eina verkætlan um at gera eina vakstraravtalu fyri Suðuroynni.

Í stuttum gongur hendan verkætlan út upp á at fáa lýst, hvørjar vakstrarmøguleikar Suðuroyggin hevur í "teirri nýggju tíðini" – við øðrum orðum, hvørjar vinnur mann eigur at leggja seg eftir í Suðuroynni. Umframt hesa lýsing er tað ein týðandi partur av verkætlanini, at ein avtala verður gjørd millum m.a. kommunur, land, og vinnulívið í Suðuroynni, har tað heilt ítøkiligt verður gjørt greitt, hvussu man í praksis førir

verkætlanina út í lívið. Ein avgerandi partur av hesum er eisini, at peningur verður settur av til at gjøgnumføra hesa vakstraravtalu.

Í skrivandi løtu (apríl 2007) er ikki greitt nær, hvussu og um arbeiðið við vakstraravtaluni fyri Suðuroynna byrjar. Lýsingin í hesum arbeiðsriti staðfestir tó akutta tørvin á, at hetta arbeiðið fer í gongd ongantíð ov skjótt.

# Keldur

Business Line (www.business-line.fo)

Hagstova Føroya (www.hagstova.fo)

Yrkisdepilin (www.yrkisdepilin.fo)

Kunningarstovan í Vági

Landsfólkayvirlitið

Skráseting Føroya

Strandfaraskip Landsins (www.ssl.fo)

Suðurrás (www.sudurras.com)

# Fylgiskjal 1. Lønargjaldingar 1985, 1995 og 2005

**Lønarútgjaldingar í vinnubólkum, býtt á sýslur, árini 1985, 1995, 2005**

| **Føroyar** | **1985** | **1995** | **2005** | **%-vísi vøkstur 1985-2005** | **%-býti, vinnu-bólkar í 2005** |
|---|---|---|---|---|---|
| Framleiðsluvinnur | 1.115.386 | 895.363 | 1.658.427 | 49% | 27,6% |
| Bygging, handil vm. | 1.052.118 | 1.002.793 | 2.126.153 | 102% | 35,4% |
| Almenn fyrisiting vm. | 776.991 | 1.147.296 | 2.220.257 | 186% | 37,0% |
| Tilsamans | 2.944.495 | 3.045.452 | 6.004.837 | 104% | 100,0% |
| **Norðoya Sýsla** | **1985** | **1995** | **2005** | **%-vísi vøkstur 1985-2005** | **%-býti, vinnu-bólkar í 2005** |
| Framleiðsluvinnur | 200.968 | 161.156 | 295.307 | 47% | 42,3% |
| Bygging, handil vm. | 95.621 | 93.471 | 187.086 | 96% | 26,8% |
| Almenn fyrisiting vm. | 83.553 | 109.423 | 216.417 | 159% | 31,0% |
| Tilsamans | 380.142 | 364.050 | 698.810 | 84% | 100,0% |
| **Eysturoyar Sýsla** | **1985** | **1995** | **2005** | **%-vísi vøkstur 1985-2005** | **%-býti, vinnu-bólkar í 2005** |
| Framleiðsluvinnur | 354.967 | 283.622 | 551.990 | 56% | 42,0% |
| Bygging, handil vm. | 170.651 | 156.013 | 395.135 | 132% | 30,1% |
| Almenn fyrisiting vm. | 90.515 | 164.869 | 367.390 | 306% | 27,9% |
| Tilsamans | 616.133 | 604.504 | 1.314.515 | 113% | 100,0% |
| **Streymoyar Sýsla** | **1985** | **1995** | **2005** | **%-vísi vøkstur 1985-2005** | **%-býti, vinnu-bólkar í 2005** |
| Framleiðsluvinnur | 261.777 | 243.551 | 445.767 | 70% | 15,1% |
| Bygging, handil vm. | 620.844 | 605.824 | 1.204.105 | 94% | 40,9% |
| Almenn fyrisiting vm. | 480.737 | 696.574 | 1.294.271 | 169% | 44,0% |
| Tilsamans | 1.363.358 | 1.545.949 | 2.944.143 | 116% | 100,0% |
| **Vága Sýsla** | **1985** | **1995** | **2005** | **%-vísi vøkstur 1985-2005** | **%-býti, vinnu-bólkar í 2005** |
| Framleiðsluvinnur | 98.905 | 60.647 | 96.752 | -2% | 31,1% |
| Bygging, handil vm. | 37.697 | 39.855 | 108.558 | 188% | 34,9% |
| Almenn fyrisiting vm. | 29.663 | 52.003 | 106.130 | 258% | 34,1% |
| Tilsamans | 166.265 | 152.505 | 311.440 | 87% | 100,0% |
| **Sandoyar Sýsla** | **1985** | **1995** | **2005** | **%-vísi vøkstur 1985-2005** | **%-býti, vinnu-bólkar í 2005** |
| Framleiðsluvinnur | 55.499 | 27.110 | 53.673 | -3% | 39,1% |
| Bygging, handil vm. | 23.889 | 20.691 | 40.199 | 68% | 29,3% |
| Almenn fyrisiting vm. | 11.420 | 19.386 | 43.430 | 280% | 31,6% |
| Tilsamans | 90.808 | 67.187 | 137.302 | 51% | 100,0% |
| **Suðuroy** | **1985** | **1995** | **2005** | **%-vísi vøkstur 1985-2005** | **%-býti, vinnu-bólkar í 2005** |
| Framleiðsluvinnur | 132.570 | 106.855 | 191.999 | 45% | 38,9% |
| Bygging, handil vm. | 91.119 | 69.818 | 136.840 | 50% | 27,8% |
| Almenn fyrisiting vm. | 67.384 | 89.588 | 164.147 | 144% | 33,3% |
| Tilsamans | 291.073 | 266.261 | 492.986 | 69% | 100,0% |

*Kelda: Hagstova Føroya*

*VIðmerkingar:* Flytingar (lønir) um samtíðarskattaskipanina 1985 - 2005 ( 1.000 kr ), flokkaðar eftir vinnugrein hjá útgjaldara og bústaðarsýslu hjá móttakara.